# Fólkatalið og ognarbýtingin í Føroyum um 1600

## við jarðabókini 1584 sum grundarlag.

Eftir *Arnbjörn Mortensen.*

### I. FÓLKATALIÐ UM 1600.

Eftir tí gamla markatalinum eru Föroyar mettar til 2406 merkur 12 gyllin og 5 skinn. Hesin matrikul hevur frá elstu tíðum verið grundarlagið fyri ásetingina av skattum, gjöldum og öðrum útreiðslum av jarðagóðsinum til ríkið, og hóast tað, at ein nýggjur matrikul varð tikin í nýtslu 29. juli 1899 sum skattagrundarlag (tær sonevndu »skattamerkurnar«, við útihýsing av gyllum og skinnum), verður tað gamla markatalið framvegis nýtt manna millum í keypi og sölu av jörð.

---

Jarðabókin 1584[1]) er elsti listin fyri Föroyar, ið til er yvir kongs- og óðalsböndurnar. Kongsbóndunum viðvíkjandi

---

[1]) Við brævi av 29. juni hetta ár (Kancelliets Brevböger 1584—88, s. 107), varð Niels Skinkel til Gjerskov settur til lensmann ella fúta í Föroyum. Í brævinum verður m. a. skilað til, at hann hvört ár til miðföstu skal gera rentimeistaranum roknskap fyri öll gjöld o. s. fr., hann krevur inn frá bóndunum, við lista yvir növn teirra. — Eisini fútarnir framman undan Niels Skinkel hövdu verið roknskaparskyldigir, men eingin roknskapur framman

lýsir hesin listi umframt festigjaldið og skattin[2]) til kongs (ríkið) markatalið, ið hvör einstakur hevði í festi av kongsjörðini (herundir prestagóðsið og lögmannsgarðurin[3]). Fyri óðalsböndurnar er uppgávan frá einum söguligum sjónarmiði tíverri ikki so fullfíggjað — her verður bert kongsskatturin[2]) nevndur og einki sagt um stöddina á teim einstöku óðalslutunum, sjálvandi av teirri orsök, at hetta seinasta var óneyðugt, tá listin jú bert umfatar tað góðsið, ið hoyrdi undir kong.

Viðvíkjandi festarum eru tað bert tílíkir, ið fest hövdu *kongsgóðsið*, ið jarðabökurnar ummæla. Eitt slag av festarum fanst tó afturat — teir sonevndu »aðalsböndurnir«, ið hövdu ognina hjá tveimum donskum og norskum aðalsættum í festi. Henda jörð var sostatt ikki kongsjörð, og festararnir av henni mugu tí ætlast at vera nevndir millum óðalsböndurnar, tí skatt til kongs skuldu allir gjalda, annaðhvört teir vóru kongsböndur, aðalsböndur ella óðalsböndur. Hetta verður viðgjört seinri.

---

undan 1584 er til skjals og jarðabókin 1584 sostatt tann elsti, ið til er. — Tær jarðabökurnar upp til 1655 (tá Kristoffer Gabel fekk oyggjarnar í len), ið eru varðveittar frá tíðini eftir 1584, eru nú — so nær sum tríggjar, ið eru í Oslo — í Ríkisskjalasavninum. Tann elsta er, sum sagt, fyri 1584, so koma fyri 16. öld tvær afturat, fyri árini 1588 og 1590. Frá 17. öld eru varðveittar fyrst tær fyri árini 1600—01, 1601—02 og 1602—03 (roknskaparárið fyri roknskapirnar eftir 1600 gongur frá Philippi Jacobi degi, 1. mai); síðan er eitt 10 ára millumbil, sum vit ongar jarðabökur vita frá. Í 1613 taka tær við aftur og eru nú til skjals fyri hvört ár frá 1613—14 til (og við) 1615—16. 1616—17 er ikki til, men frá 1617—18 halda tær áfram uttan steðg upp til 1624—25; 1625—26 er ikki til, og halda tær so fram aftur heilt upp til 1641—42. Fyri 1642—43, 1643—44 og 1644—45 eru aftur ongar, men síðani eru tær við undantöku av 1646—47 varðveittar til 1652—53. Tær tvær síðstu upp til 1655 eru ikki at finna. — Tær nevndu tríggjar, sum eru í Oslo, eru roknskapirnir fyri árini 1645—46, 1647—48 og 1648—49.

[2]) Kongsskatturin varð goldin bæði av kongsbóndum og óðalsbóndum. Viðvíkjandi kongsskattinum sæst av jarðabókunum, at hann hevur ikki verið líknaður eftir stöddini á festunum (ein maður við t. d. 8, 10 ella 20 mk. í jörð kann væl hava sama skatt, 1 gl. t. d., sum ein annar við t. d. 1 ella bert ½ mörk). Tað sama mugu vit halda viðvíkjandi óðalsbóndunum. — Skatturin má sostatt vera líknaður uttan mun til fíggjarligar umstöður og mest vera at sammeta við koppskatt.

[3]) Og sjúkrahúsjörðin á Argjum (sb. s. 21 og 46).

Telir ein skattakontoirnar upp eftir jarðabókini 1584, verður úrslitið hetta:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | (kongsb. | 56, | óðalsb. | 43) | 99 |
| Sandoy og St. Dímun | ( — | 27, | — | 30) | 57 |
| Skúvoy | ( — | 7, | — | 4) | 11 |
| Mykines | ( — | 8, | — | 7) | 15 |
| Vágar | ( — | 25, | — | 9) | 34 |
| Streymoy | ( — | 77, | — | 16) | 93 |
| Nólsoy | ( — | 8, | — | 8) | 16 |
| Hestur | ( — | 4, | — | 0) | 4 |
| Koltur | ( — | 2, | — | 0) | 2 |
| Eysturoy | ( — | 95, | — | 29) | 124 |
| Norðuroyar | ( — | 53, | — | 24) | 77 |
| | | | | Íalt | 532 |

Tað högligasta vildi nú verið beinleiðis at tikið talið 532 sum umboðandi so mangar uppihaldarar, latið hvönn av hesum umboðað eitt hóskandi miðaltal av persónum og faldað hesi bæði tölini hvört við öðrum. Úrslitið kundi so verið tikið sum mát fyri fólkatalið í Föroyum um ár 1600.

Men kannar ein jarðabókina gjöllari, verður ein skjótt varur við, at so lagaligt liggur tað ikki fyri at finna fólkatalið. Tí ein tílík kannan vil avdúka, at av növnunum í jarðabókini eru ein nögd nevnd tvær ella fleiri ferðir, og viðvíkjandi nökrum av hesum növnum kunnu vit við at taka ættargransking til hjálpar við vissu sláa fast, í öðrum förum taka tað fyri mest líkt til, at tey umboða teir somu persónarnar. Arbeiði okkara verður tí (1) at kanna eftir, hvussu nógvar verunligar uppihaldarar, növnini í jarðabókini umboða, t. v. s. hvussu nógv tað er neyðugt at minka um tey omanfyri standandi tölini fyri tær einstöku oyggjarnar. Harnæst (2) verður neyðugt at meta um, hvussu nógvir uppsitarar kunnu hugsast at hava verið, t. v. s. um ein maður, ið stendur sum lánari ella ánari av fleiri búum, kann hava havt ein uppsitara á summum av teimum; her verður eisini at hava í huga, hvussu langt hesi búgv liggja hvört frá öðrum

og stödd teirra — við öðrum orðum, um ein »jarðadrottur« sjálvur hevur kunnað rökt öll ella fleiri av búum sínum, ella um summi av teimum hava ligið so fjart frá »hövuðsgarðinum«, at hann hevur verið noyddur at hava uppsitarar á teimum, — ella um ein ella fleiri av görðunum hava verið so stórir, at neyðugt kann hava verið at hava ein uppsitara, sjálvt um fjarstöða ikki nýtist at hava forðað honum í at reka teir sjálvur.

Kongsböndur í Suðuroy 1584 og jörð teirra:
(Jarðabókin vísir 56 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Suðuroy in 1584.*

| | B[5]) | A[4]) | | mk. | C[6]) |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvalbæ | 1 | 1 | Elling Joensen | 7 | nr. 15 |
| | 2 | 2 | Mathias Gutormsen } | 1/2 | |
| | 3 | 3 | Børge Nielsen } | | |
| | 4 | 4 | Simon Thomissen | 5 1/2 | óðalsbóndi nr. 7 |
| | 5 | 5 | Vindse Olufsen | 1/2 | |
| | 6 | 6 | Thomas Simensen } | | |
| | 7 | 7 | Joen Olufsen } | | |
| | 8 | 8 | Joen Joensen } | | |
| | 9 | 9 | Thomas Staffensen } | 2 | |
| | 10 | 10 | Michel Ellingsen } | | |
| | 11 | 11 | Poul Staffensen } | | |
| | 12 | 12 | Oluf Børgesen | 1/2 | óðalsbóndi nr. 5 |
| | 13 | 13 | Joen Helgesen | 6 | |
| | 14 | 14 | Holden Gudelochsen | 3 | |
| | ÷ | 15 | Elling Joensen | 1 1/2 | nr. 1 |
| | 15 | 16 | Hr. Ismael Nielsen[7]) | 12 1/2 | prstg., bnf., óðb. 6 |

[4]) Hetta rað sýnir tey »upprunaligu« nummör í tí raði, növnini eru skrivað av eftir jarðabókini. Í henni eru kongsböndur og óðalsböndur tiknir hvör um annan, men her eru teir tiknir hvör fyri seg.

[5]) Rað B eru tey »rættu« nummör, ið koma, tá tey növn í raði A verða tikin *eina* ferð, sum har standa tvær ella fleiri ferðir og sum (helst) merkja somu menn. Viðv. frágreiðingini av óðalsb. í raði B, sí viðm. 12.

[6]) Rað C sýnir (1) nummörini á teim növnum, ið eru nevnd tvær ella fleiri ferðir í *raði A* (dömi: nr. 1 í raði A, Elling Joensen, er tann sami sum nr. 15 í sama raði, og tí er í raði C víst á nr. 15 í raði A. — Umframt er hann merktur við einum ÷ í raði B út fyri nr. 15 í raði A fyri at sleppa undan, at hann verður nevndur meira enn eina ferð í tí eftirlýsta festaratalinum, (2) teir möguligi uppsitararnar, (3) viðv. festarunum, um teir umframt eru óðalsb. (og viðv. teimum, um teir eisini eru festarar).

[7]) Prestur í Suðuroy 1550—1601.

| | B | A | | mk. | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Froðbæ | 16 | 17 | Brixius Staffensen | 1 | |
| | 17 | 18 | Joen Staffensen | | |
| | 18 | 19 | Anders Gutormsen | $^1/_2$ | |
| | ÷ | 20 | Peder Jacobsen[8]) | 2 | n. 27, 30, 36, v. upps. |
| Øravík | 19 | 21 | Gudeloch Thomissen | $1^1/_2$ | nr. 24 |
| | ÷ | 22 | Niels Thomissen[9]) | $1^5/_8$ | nr. 52, við upps. |
| | ÷ | 23 | Søren Jørgensen[9]) | | nr. 54, við upps. |
| | ÷ | 24 | Gudeloch Thomissen | 6 | nr. 21 |
| Hov | 20 | 25 | Gutorm Nielsen | $^1/_2$ | nr. 29, 46 |
| | 21 | 26 | Peder Bastiansen | $^1/_2$ | |
| | ÷ | 27 | Peder Jacobsen | $2^1/_2$ | 20, 30, 36, v. upps. |
| | 22 | 28 | Anders Poulsen | $^3/_4$ | |
| | ÷ | 29 | Gutorm Nielsen | 1 | 25, 46 |
| Þorkeri | ÷ | 30 | Peder Jacobsen | $6^3/_8$ | nr. 20, 27, 36. Við 1 uppsit. fyri 30 og 36 |
| | 23 | 31 | Magnus Andersen | $^1/_2$ | nr. 12 u. kb. Eysturoy |
| | 24 | 32 | Sivert Børgesen | $^3/_4$ | |
| | 25 | 33 | Joen Albridsen | 1 | óðalsbóndi nr. 21 |
| | 26 | 34 | Simen Albridsen | | |
| | 27 | 35 | Staffen Brixesen | | |
| | ÷ | 36 | Peder Jacobsen | 2 | 20, 27, 30; óðb. nr. 25 |
| Nes | 28 | 37 | Isak Gutormsen[10]) | $4^3/_4$ | nr. 39 |
| | 29 | 38 | Staffen Poulsen | $^3/_4$ | óðalsbóndi nr. 22 |
| Vágur | ÷ | 39 | Isak Gutormsen[10]) | $3^1/_4$ | nr. 37 |
| | 30 | 40 | Niels Andersen | $^3/_4$ | |
| | 31 | 41 | Thorsten Staffensen | $^3/_4$ | |
| | 32 | 42 | Jens Tormodsen | 1 | |
| | 33 | 43 | Joen Andersen | $^1/_2$ | Verunl. 10 mk., harav $4^5/_8$ til prestin sum beneficarium |
| | 34 | 44a | Magnus Andersen | $5^3/_8$ | |
| | ÷ | 44b | Hr. Ismael Nielsen | $4^5/_8$ | |

[8]) Peder Jacobsen, lögmaður 1588—1601, var ein av teim störstu ognarmonnunum. Sat við fleiri festum bæði her og í Streymoy. Största festi hansara var Kirkjuböur (nr. 5 og 6, rað A, s. 21); tí er hann fyrst roknaður við har (sb. viðm. 21).

[9]) Tá báðir eisini hava verið kongsb. í Fámjin og harumframt hava havt sjálvsogn har, hava teir helst havt uppsitara á teirra felags festi her í Øravík, sjálvt um tað ikki er so langt millum bygdirnar (sb. viðm. 11).

[10]) Isak Gutormsen var lögmaður 1583—88 og hevði sostatt í hesum tíðarbili (1584) lögmannsgaðin umframt (nr. 17, rað A, í Vágum, s. 19). Hann hevur tó óivað havt bústað annaðhvört á Nesi (Suðuroy) ella í Vági og havt uppsitara í Vágum. Tey bæði festini á Nesi og í Vági hevur hann óivað rökt undir einum.

| | B | A | | mk. | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Sunnbæ | 35 | 45 | Thomas Nielsen | 2 | |
| | ÷ | 46 | Gutorm Nielsen | 1 | nr. 25, 29; við upps. |
| | 36 | 47 | Peder Gundersen | $1\frac{5}{8}$ | |
| | 37 | 48 | Jens Joensen | $10\frac{1}{4}$ | |
| | 38 | 49 | Morten Andersen | $4\frac{5}{8}$ | |
| | 39 | 50 | Gutorm Olufsen | $1\frac{1}{2}$ | |
| | 40 | 51 | Rasmus Gutormsen | 1 | |
| Fámjin | 41 | 52 | Niels Thomesen | | nr.22, óðb. 33, 34 |
| | 42 | 53 | Poul Dagfindsen | | óðalsb. 36 |
| | 43 | 54 | Søren Jørgensen | 3[11]) | nr. 23, óðb. 35 |
| | 44 | 55 | Sivardt Nielsen | | óðalsb. 37 |
| | 45 | 56 | Hogen Gutormsen | | óðalsb. 40 |

Úrslitið av lækkingini verður eftir hesum:

45 kongsbøndur, 5 uppsitarar = 50 uppihaldarar.

[11]) Í jarðabókunum fyri 1588 og 1590 stendur, at hesin garður »er for mange Aar (síðan?) afbrött og ödelagt«, og tí lata »alle Fammöe Mendt« leigu av honum, tí teir brúka hann. Tá tað í 1584 eru heilir 5 festarar um hann, má hann eisini hava verið oyðilagdur í tí tíðarbili, og tá hesir 5 festarar allir umframt hava havt ogn sjálvir, hava teir ivaleyst bert röktað hann sum uppískoyti til teirra egnu jörð. Tveir av teimum, Niels Thomesen og Sören Jörgensen, eru umframt festarar í Øravík.

## Óðalsböndur í Suðuroy 1584:

(Jarðabókin vísir 43 kontoir)

*Freeholders in Suðuroy in 1584.*

| | B[12]) | A | | C |
|---|---|---|---|---|
| Hvalbæ | 1 | 1 | Blasius Gutormsen | |
| | 2 | 2 | Thorbjørn Simensen | |
| | 3 | 3 | Laurids Simensen | |
| | 4 | 4 | Nicolaus Holdensen | |
| | ÷ | 5 | Oluf Børgesen | nr. 12 u. kongsb. |
| | ÷ | 6 | Hr. Ismael Nielsen | nr. 16 u. — |
| | ÷ | 7 | Simon Thomissen | nr. 4 u. — |
| | 5 | 8 | Gudeloch Thomissen | |
| | 6 | 9 | Oluf Joensen | |
| | ÷ | 10 | Nøste mænd | einki tal viðm. |
| Trongisvágur | 7 | 11 | Jacob Joensen | |
| | 8 | 12 | Clemendt Gutormsen | nr. 24 her |
| | 9 | 13 | Oluf Gutormsen | |
| | 10 | 14 | Joen Gutormsen | |
| | ÷ | 15 | Hr. Holden Andersen[13]) | prestur í Vágum, |
| | 11 | 16 | Roffue Clemendsen | við uppsitara |
| Froðbæ | 12 | 17 | Joen Jespersen | |
| | 13 | 18 | Oluf Mogensen | |
| Hov | 14 | 19 | Poul Staffensen | |
| | 15 | 20 | Peder Dagfindsen | |
| Porkeri | ÷ | 21 | Simon Albridsen | 34 undir kongsb. |
| | ÷ | 22 | Staffen Poulsen | 38 — — |
| | 16 | 23 | Joen Joensen | |
| | ÷ | 24 | Clemendt Gutormsen | 12 her, við upps. |
| | ÷ | 25 | Peder Jacobsen | 27 o. fl. u. kongsb. |
| | 17 | 26 | Samuel Andersen | |
| Nes | 18 | 27 | Michel Nielsen | |
| | 19 | 28 | Gutorm Endersen | |
| Sunnbæ | 20 | 29 | Niels Madsen | |
| | 21 | 30 | Joen Madsen | |
| | 22 | 31 | Joen Bodelsen | |
| | 23 | 32 | Jacob Mortensen | |
| Fámjin | ÷ | 33 | Niels Thomisen | } 52 u. kongsb. |
| | ÷ | 34 | Niels Thomissen | |
| | ÷ | 35 | Søren Jørgensen | 23, 54 u. — |
| | ÷ | 36 | Poul Dagfindsen | 53 u. — |
| | ÷ | 37 | Sivordt Nielsen | 55 u. — |
| | 24 | 38 | Joen Joensen | |
| | 25 | 39 | Joen Andersen | |
| | ÷ | 40 | Hogen Gutormsen | 56 u. — |
| | 26 | 41 | Sifvard Septensen | |
| | 27 | 42 | Ambrosius Gutormsen | |
| | 28 | 43 | Bertel Brynildsen | |

[12]) Í rað B yvir óðalsb. eru bert settir teir »verunligu« óðalsb., t. v. s. tílíkir, sum ikki eisini eru settir sum *kongsb.* í jarðabókini. Teir, sum eisini

Úrslitið av lækkingini fyri óðalsbøndurnar verður eftir hesum:
28, sum einans eru óðalsbøndur og 2 uppsitarar
= 30 uppihaldarar.

Uppihaldarar í Suðuroy tilsamans:
*(Maintainers in Suðuroy)*

| | |
|---|---|
| Kongsbøndur | 45 |
| Óðalsbøndur | 28 |
| Uppsitarar | 7 |
| | 80 |

---

eru tað, eru longu settir undir kongsbóndunum, og rað C vísir nummörini millum teirra ((sb. viðm. (5 og) 6).

[13]) Er fyrst tikin við í tí eftirlýsta talinum fyri uppihaldarar undir Vágum (sb. viðm. 17).

## Kongsböndur í Sandoy 1584 og jörð teirra:

(Jarðabókin vísir 26 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Sandoy in 1584.*

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Sandur | 1 | 1 | Hr. Niels (Christensen)[14] | 10 | prestagarður, benef. |
| | 2 | 2 | Benedikt Joensen | $2\frac{1}{4}$ | |
| | ÷ | 3 | Thomis Jørgensen | $1\frac{3}{4}$ | bóndi á Stóru Dímun |
| | 3 | 4 | Erik Joensen | $7\frac{1}{4}$ | [óðalsb., við upps. |
| | 4 | 5 | Oluf Staffensen } | $\frac{1}{2}$ | |
| | 5 | 6 | Joen Staffensen } | | |
| | 6 | 7 | Erik Staffensen } | | |
| | 7 | 8 | Børge Andersen } | | |
| | 8 | 9 | Oluf Andersen | $\frac{1}{4}$ | |
| | 9 | 10 | Svend Mikkelsen | 1 | |
| | 10 | 11 | Esaias Joensen | $2\frac{1}{2}$ | |
| | 11 | 12 | Niels Clemendsen | $4\frac{1}{2}$ | óðalsb. nr. 3 og 8 |
| | 12 | 13 | Jens Asbjørnsen | 1 | óðalsb. 4 í Skúvoy |
| | 13 | 14 | Joen Joensen | 24 | |
| Skálavík | 14 | 15 | Jacob Sivordtsen } | $2\frac{1}{2}$ | nr. 25 |
| | 15 | 16 | Joen Jacobsen } | | |
| | 16 | 17 | Mathias Sivordtsen } | | |
| | 17 | 18 | Joen Gutormsen | 10 | |
| | 18 | 19 | Joen Børgesen | $1\frac{1}{4}$ | |
| | ÷ | 20 | Joen Heinesen[15] | $1\frac{1}{4}$ | við uppsitara |
| Húsavík | 19 | 21 | Gutorm Asbjørnsen | 3 | nr. 24, óðb. nr. 25 |
| | 20 | 22 | Daniel Nielsen | 2 | |
| Dalur | 21 | 23 | Joen Trondesen | 1 | |
| Skarva- | ÷ | 24 | Gutorm Asbjørnsen | 1 | nr. 21 |
| nes | ÷ | 25 | Joen Jacobsen } | 1 | nr. 16 |
| | 22 | 26 | Sallemand Jacobsen } | | |

Úrslitið av lækkingini verður:

22 kongsbøndur, 2 uppsitarar = 24 uppihaldarar.

14) Prestur í Sandoy 1583—98.

15) Er fyrst tikin við í tí eftirlýsta talinum fyri uppihaldarar undir Eysturoy (sb. viðm. 27).

## Óðalsböndur í Sandoy 1584:

(Jarðabókin vísir 30 kontoir)

*Freeholders in Sandoy in 1584.*

| | B | A | | C |
|---|---|---|---|---|
| Sandur | 1 | 1 | Peder Joensen | |
| | 2 | 2 | Clemend Pedersen | |
| | ÷ | 3 | Niels Clemendsen | 12 undir kongsb. |
| | 3 | 4 | Peder Bertelsen | |
| | 4 | 5 | Erlender Jørgensen | |
| | 5 | 6 | Joen Pedersen | |
| | 6 | 7 | Holden Clemendsen | |
| | ÷ | 8 | Niels Clemendsen | 3 her |
| | 7 | 9 | Sidsel Joensdatter | |
| | 8 | 10 | Joen Eriksen | 19 her |
| | ÷ | 11 | Peder Joensen | 1 her |
| | ÷ | 12 | Thomis Jørgensen | 3 undir kongsbøndur |
| Skálavík | 9 | 13 | Jacob Antonissen | |
| | 10 | 14 | Asbjørn Antonissen | |
| | 11 | 15 | Thomis Trundesen | |
| | 12 | 16 | Niels Trundesen | óðb. í Skúvoy, nr. 1 |
| | 13 | 17 | Bertel Pedersen | |
| | 14 | 18 | Joen Davidsen | |
| | ÷ | 19 | Joen Eriksen | 10 her |
| | 15 | 20 | Simon Gutormsen | |
| | 16 | 21 | Olaf Brundisen | |
| | 17 | 22 | Joen Joensen | |
| | 18 | 23 | Poul Joensen | |
| | 19 | 24 | Morten Eriksen | |
| Húsavík | ÷ | 25 | Gutorm Asbjørnsen | 21, 24 undir kb. |
| | 20 | 26 | Jacob Karsen | 27, 28 her |
| | ÷ | 27 | Jacob Karsen | 26, 28 her |
| Dalur | ÷ | 28 | Jacob Karsen | 26, 27 her |
| | 21 | 29 | Oluf Frandtsen | |
| | 22 | 30 | Niels Frandtsen | |

Úrslitið av lækkingini verður 22 »verunligir« (ɔ: sum einans eru) óðalsbøndur.

Stóra Dímun: 1 festi, Thomis Jørgensen — 13 merkur.

Uppihaldarar í Sandoy og Stóru Dímun tilsamans:
*(Maintainers in Sandoy and St. Dímun)*
Kongsbøndur 23, óðalsbøndur 22, uppsitarar 2 = 47.

## Kongsböndur í Skúvoy 1584 og jörð teirra:
(Jarðabókin vísir 7 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Skúvoy in 1584.*

| B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1 | Magnus Joensen | 8 | |
| 2 | 2 | Thomas Simonsen | $9^1/_2$ | |
| 3 | 3 | Morten Eriksen | | |
| 4 | 4 | Peder Sæbjørnsen | 1 | |
| 5 | 5 | Poul Joensen | $6^1/_2$ | |
| 6 | 6 | Magnus Joensen | $5^1/_2$ | |
| ÷ | 7 | Niels Joensen | ?[16]) | 8 u. kb. í Streymoy |

Úrslitið av lækkingini verður 6 kongsbøndur.

## Óðalsböndur í Skúvoy 1584:
(Jarðabókin vísir 4 kontoir)

*Freeholders in Skúvoy in 1584.*

| B | A | | C |
|---|---|---|---|
| ÷ | 1 | Niels Trundesen | 16 u. óðb. í Sandoy |
| 1 | 2 | Jacob Joensen | |
| 2 | 3 | Thomas Joensen | |
| ÷ | 4 | Jens Asbjørnsen | 13 u. kb. í Sandoy |

Úrslitið av lækkingini verður 2 »verunligir« óðalsbøndur.

Uppihaldarar í Skúvoy tilsamans:
*(Maintainers in Skúvoy)*

Kongsbøndur 6, óðalsbøndur 2 = 8.

---

[16]) Í hesum föri lýsir jarðabókin einki markatal, tá tað, ið talan er um, er leigan av 20 seyðafrælsum, ið Niels Joensen hetta ár hevur givið sum ágávu av Velbastað. (Viðv. ágávu, sí A. Degn: Færöske Kongsbönder, s. VI og Jacobsen og Matras: Föroysk-donsk orðabók, s. 3).

## Kongsböndur í Mykinesi 1584 og jörð teirra:

(Jarðabókin vísir 8 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Mykines in 1584.*

| B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|
| ÷ | 1 | Joen Mikkelsen | 5 | 23 u. kb. í Vágum |
| 1 | 2 | Oluf Nielsen | $\frac{1}{2}$ | 4 her |
| 2 | 3 | Oluf Eriksen | $\frac{1}{4}$ | |
| ÷ | 4 | Oluf Nielsen | $\frac{1}{2}$ | 2 her |
| 3 | 5 | Thomas Simensen | $1\frac{1}{4}$ | |
| 4 | 6 | Philippus Gregersen } | $3\frac{3}{4}$ | 2 u. óðb. í Vágum |
| 5 | 7 | Jesper Joensen } | | |
| 6 | 8 | Oluf Joensen | $\frac{3}{4}$ | |

Úrslitið av lækkingini verður 6 kongsbøndur.

## Óðalsböndur í Mykinesi 1584:

(Jarðabókin vísir 7 kontoir)

*Freeholders in Mykines in 1584.*

| B | A | | C |
|---|---|---|---|
| 1 | 1 | Blasius Harildsen | |
| 2 | 2 | Gutorm Trildsen | |
| 3 | 3 | Mathias Joensen | |
| 4 | 4 | Barnaba Ellingsen | |
| 5 | 5 | Rasmus Poulsen | |
| 6 | 6 | Joen Simensen | |
| 7 | 7 | Morten Joensen | |

Her kann eingin lækking gerast, tessvegna eru framvegis 7 óðalsbøndur.

Uppihaldarar í Mykinesi tilsamans:

*(Maintainers in Mykines)*

Kongsbøndur 6, óðalsbøndur 7 = 13.

## Kongsböndur í Vágum 1584 og jörð teirra:

(Jarðabókin vísir 25 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Vágar in 1584.*

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Gása-dalur | 1 | 1 | Thommis Persen | 1½ | |
| | 2 | 2 | Siffuerd Harrildsen | ½ | 22 her |
| | 3 | 3 | Staffen Thamensen | | |
| | 4 | 4 | Peder Nielsen | 1½ | |
| | 5 | 5 | Joen Augustinussen | | |
| Bøur | 6 | 6 | Philippus Joensen | 3¼ | |
| | 7 | 7 | Gutorm Harildsen | 7 | |
| | 8 | 8 | Thomis Harildsen | | |
| | 9 | 9 | Thomis Pedersen | 3 | óðalsbóndi nr. 7 |
| Mið-vágur | 10 | 10 | Hr. Holden Anders.[17]) | 9½ | prestagarður, benef. |
| | ÷ | 11 | Hr. Holden Andersen | 6 | 10, óðalsbóndi 5 |
| | 11 | 12 | Jacob Gutormsen | 4 | 14 her |
| | 12 | 13 | Poul Tordsen | 1½ | 20 her |
| | ÷ | 14 | Jacob Gutormsen | | 12 her |
| | 13 | 15 | Mads Mathiesen | 2½ | |
| | 14 | 16 | Sivard Olufsen | | |
| Sanda-vágur | ÷ | 17 | Lagmandsgaarden[18]) | 16 | benef., v. upps. |
| | 15 | 18 | Anders Østensen | 2¼ | |
| | 16 | 19 | Joen Andersen | 1¼ | |
| | ÷ | 20 | Poul Tordsen | 1 | 13 her |
| | 17 | 21 | Dionis Poulsen | 1 | |
| | ÷ | 22 | Sivard Harildsen | 2 | 2 her |
| | 18 | 23 | Joen Mikkelsen | 1 | 1 u. kb. í Mykinesi |
| | 19 | 24 | Thorbjørn Gutorms. | 2 | |
| | 20 | 25 | Holden Gutormsen | | |

Úrslitið av lækkingini verður:
20 kongsbøndur, 1 uppsitari = 21 uppihaldarar.

17) Prestur í Vágum 1556—1602. Umframt samstundis at vera bæði kongs- og óðalsb. her, er hann eisini óðalsb. í Suðuroy (sb. viðm. 13).

18) Sb. viðm. 10.

## Óðalsböndur í Vágum 1584:

(Jarðabókin vísir 9 kontoir)

*Freeholders in Vágar in 1584.*

| | B | A | | C |
|---|---|---|---|---|
| Bøur | 1 | 1 | Niels Philipsen | |
| Sørvágur | ÷ | 2 | Philippus Gregersen | 6 u. kb. í Mykinesi |
| | 2 | 3 | Niels Andersen | |
| | 3 | 4 | Thommes Nielsen | |
| Miðvágur | ÷ | 5 | Hr. Holden Andersen | 10 og 11 undir kb. |
| | ÷ | 6 | Hr. Thorluf Gregersen[19]) | próstur, við upps. |
| | ÷ | 7 | Thommes Pedersen | 9 undir kb. |
| | 4 | 8 | Niels Septensen | |
| | 5 | 9 | Niels Lykesen | |

Úrslitið av lækkingini verður:

5 »verunligir« óðalsbøndur, 1 uppsitari = 6 uppihaldarar.

Uppihaldarar í Vágum tilsamans:

*(Maintainers in Vágar)*

Kongsbøndur 20, óðalsbøndur 5, uppsitarar 2 = 27.

[19]) Er fyrst tikin við í tí eftirlýsta talinum fyri uppihaldarar undir Eysturoy (sb. viðm. 26).

## Kongsböndur í Streymoy 1584 og jörð teirra:

(Jarðabókin vísir 77 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Streymoy in 1584.*

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 1 | 1 | Magnus Pedersen } | 8 | 18 her |
| | 2 | 2 | Hr. Morten Jespersen[20] } | | 14, 19, 54, 55, 77 |
| | 3 | 3 | Laurids Andersen | 2 | |
| Argir | ÷ | 4 | Hospitalet | 4 | við uppsitara |
| Kirkjubøur | 4 | 5 | Peder Jacobsen[21] | 20 | 6, 41 |
| | ÷ | 6 | Peder Jacobsen | 32 | 5, 41 |
| Velbastaður | ÷ | 7 | Troels Blasiussen } | 6 | 75, við uppsitara |
| | ÷ | 8 | Niels Joensen } | | 13, 62, 65, 67 og 7 u. kongsb. í Skúvoy |
| | 5 | 9 | Hr. Christen N. (Pedersen Morsing[22]) } | | 10 |
| | ÷ | 10 | Hr. Christen N. | 6 | 9 |
| | 6 | 11 | Hustru Anne | 2 | |
| | 7 | 12 | Jacob Poulsen | 2 | |
| | ÷ | 13 | Niels Joensen | 11 | 8 o. fl., óðalsb. 8, við upps. |
| | ÷ | 14 | Hr. Morten Jespersen | 1 | 2, 19, 54, 55, 77 |
| | 8 | 15 | Benedikt Thorbjørns. | 1 | |
| | 9 | 16 | Laurids Helgesen | 1 | |
| | 10 | 17 | Oluf Jacobsen | 1 | |
| | ÷ | 18 | Magnus Pedersen | 1 | 1 her |
| Syðridalur | ÷ | 19 | Hr. Morten Jespersen[23] | 16 | prestag., benef., við upps. |
| Norðradalur | 11 | 20 | Børge Smed | 9 | |
| | 12 | 21 | Magnus Poulsen | 10½ | |
| Skæling. | 13 | 22 | Joen Sivertsen | 15 | 38, 58; óðalsbóndi 2 í Nólsoy |
| Leynar | 14 | 23 | Arne Simonsen | 6 | |
| | ÷ | 24 | Oluf Joensen | 6 | 45, 50, við upps. |
| Kvívík | 15 | 25 | Hr. Anders Hendriksen[24] | 8 | prestag.; benefic. |

[20]) Morten Jespersen Brunck var prestur í Suðurstreymoy til 1590, kanska fyrsti evangeliski prestur her aftan á trúbótina; hevur eisini verið rektari fyri latínskúlan í Havn, stovnaður um 1547 — sb. Degn: Fær. Kongsb., s. 8. — Harumframt var hann ein av störstu ognarmonnunum í oyggjunum og sat við 34 mk. í festi umframt prestagarðinum í Syðradali.

[21]) Var, sum nevnt (viðm. 8), ein av störstu ognarmonnunum í landinum, rættari sagt tann næststörsti við tilsamans 66⁷/₈ mk. í festi (54 mk. her og 12⁷/₈ mk. í Suðuroy) og óðalsb. (í Suðuroy).

[22]) Prestur í Suðurstreymoy 1590—1630. — Um hetta mundið kapellanur hjá Morten Jespersen.

[23]) Beneficarium fyri prestin í Suðurstreymoy. Tá presturin hevði bústað í Havn, hevur hann havt uppsitara her í Syðradali.

[24]) *Prestur í Norðstreymoy 1583—1602.*

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| | 16 | 26 | Magnus Joensen | 1 | |
| | 17 | 27 | Jens Simonsen | $1\frac{1}{4}$ | |
| | ÷ | 28 | Oluf Thomesen | $1\frac{1}{4}$ | 35, 40 |
| | 18 | 29 | Staffen Joensen | $\frac{1}{2}$ | |
| | ÷ | 30 | Hr. Anders Hendriks. | 6 | 25, 34, 61; óðb. 1 og 6 |
| | 19 | 31 | Peder Joensen | $\frac{1}{2}$ | |
| | 20 | 32 | Magdalene Joensd. | 1 | |
| | 21 | 33 | Anders Østensen | $1\frac{1}{4}$ | |
| | ÷ | 34 | Hr. Anders Hendriks. | $\frac{1}{2}$ | 25, 30, 61 |
| Vest- | 22 | 35 | Oluf Thomesen | 18 | 28, 40 |
| manna | 23 | 36 | Hans Madsen | 1 | 44 |
| | 24 | 37 | Jacob Thorrildsen | $\frac{1}{2}$ | |
| | ÷ | 38 | Joen Sivertsen | 3 | 22, 58, við upps. |
| | 25 | 39 | Mathias Magnussen | $\frac{3}{4}$ | |
| | ÷ | 40 | Oluf Thomesen } | 4 | 28, 35 |
| | ÷ | 41 | Peder Jacobsen } | | 5, 6 |
| | ÷ | 42 | Joen Heinesen | 2 | 53 o.fl. Eyst.oy, v. ups. |
| | 26 | 43 | Oluf Madsen } | 4 | |
| | ÷ | 44 | Hans Madsen } | | 36 |
| Saxun | 27 | 45 | Oluf Joensen | 8 | 24, 50, óðb. 7 |
| | 28 | 46 | Hans Joensen } | $9\frac{1}{2}$ | |
| | 29 | 47 | med sin Svoger } | | |
| | 30 | 48 | Jens Nielsen } | $9\frac{1}{2}$ | |
| | 31 | 49 | Peder Nielsen } | | |
| Tjørnu-vík | ÷ | 50 | Oluf Joensen | 4 | 24, 45, við upps. |
| Haldórs- | 32 | 51 | Abraham Joensen | $1\frac{1}{2}$ | |
| vík | 33 | 52 | Simon Jacobsen | $1\frac{3}{4}$ | |
| | 34 | 53 | Niels Gutormsen | 1 | 66 |
| Streym-nes | ÷ | 54 | Hr. Morten Jespersen | 6 | 2, 19, 14, 55, 77 } v. ups. |
| Hvalvík | ÷ | 55 | Hr. Morten Jespersen | 14 | 2, 14, 19, 54, 77 } |
| Hósvík | 35 | 56 | Poul Magnussen | 10 | 57 |
| | ÷ | 57 | Poul Magnussen | $4\frac{1}{2}$ | 56 |
| | ÷ | 58 | Joen Sivertsen | $4\frac{1}{2}$ | 22, 38, við upps. |
| Kolla- | 36 | 59 | Reiniche Hermands. | $8\frac{1}{2}$ | 60 |
| fjørður | ÷ | 60 | Reiniche Hermands. | 4 | 59 |
| | ÷ | 61 | Hr. Anders Hendriks. | 4 | 25, 30, 34, við upps. |
| | ÷ | 62 | Niels Joensen | 2 | 8, 13, 65, 67 |
| | 37 | 63 | Jacob Gutormsen | 4 | |
| | 38 | 64 | Karl Fabisen | $\frac{1}{2}$ | |
| | ÷ | 65 | Niels Joensen | $1\frac{1}{2}$ | 8. 13, 62, 67 |
| | ÷ | 66 | Niels Gutormsen | 4 | 53 |
| | 39 | 67 | Niels Joensen | 12 | 8, 13, 62, 65 |
| | 40 | 68 | Joen Gutormsen | 4 | óðalsbóndi 12 |
| | 41 | 69 | Hogen Simonsen | 4 | |
| | 42 | 70 | Justinus Joensen | 6 | |
| Kaldbak | 43 | 71 | Hans Vindesen } | 16 | |
| | 44 | 72 | Oluf Vindesen } | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Kaldbak | ÷ | 73 | Thomes Simensen | 12 | 74 |
| | 45 | 74 | Thomes Simensen | 16 | 73 |
| Sund | 46 | 75 | Truels Beasiussen | 12 | 7 |
| Hoyvík | 47 | 76 | Jens Olufsen | 9 | |
| | ÷ | 77 | Hr. Morten Jespersen | 9 | 2, 14, 19, 54, 55, v. upps. |

Úrslitið av lækkingini verður:
47 kongsbøndur, 12 uppsitarar = 59 uppihaldarar.

## Óðalsböndur í Streymoy 1584:
(Jarðabókin vísir 16 kontoir)

*Freeholders in Streymoy in 1584.*

| | B | A | | C |
|---|---|---|---|---|
| Kvívík | ÷ | 1 | Hr. Anders Hendriks. | 25, 30, 34, 61 u. kb. |
| | ÷ | 2 | Hr. Euden Anders.[25] | 89 u. kb. í Eysturoy, v. uppsitara |
| | ÷ | 3 | Oluf Sivordsen | 37, 43 u. kb. í Eysturoy, við upps |
| | 1 | 4 | Joen Michelsen | |
| Vestmanna | 2 | 5 | Jacob Hendriksen | |
| Tjørnuvík | ÷ | 6 | Hr. Anders Hendriks. | 1, kanska upps. |
| | ÷ | 7 | Oluf Joensen | 45, 50 u. kb. |
| Haldórsvík | ÷ | 8 | Niels Joensen | 8 o.fl. u. kb., v. upps. |
| | ÷ | 9 | David Andersen | 5 u. kb. í Nólsoy, við upps. |
| | 3 | 10 | Michel Høgnesen | |
| | 4 | 11 | Mads Andersen | óðb. í Nólsoy 1 |
| | ÷ | 12 | Joen Gutormsen | 68 u. kb. við upps. |
| | 5 | 13 | Peder Joensen | |
| | 6 | 14 | Knud Joensen | |
| Streymnes | 7 | 15 | Jacob Poulsen | 16 |
| | ÷ | 16 | Jacob Poulsen | 15 |

Úrslitið av lækkingini verður:
7 »verunligir« óðalsbøndur, 6 uppsitarar = 13 uppihaldarar.

Uppihaldarar í Streymoy tilsamans:
*(Maintainers in Streymoy)*
Kongsbøndur 47, óðalsbøndur 7, uppsitarar 18 = 72.

[25]) Er fyrst tikin við í tí eftirlýsta talinum fyri uppihaldarar undir Eysturoy (sb. viðm. 29).

## Kongsböndur í Nólsoy í 1584 og jörð teirra:

(Jarðabókin vísir 8 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Nólsoy in 1584.*

| B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1 | Bodel Hendriksen | $1^1/_2$ | |
| 2 | 2 | Helge Pedersen | 1 | |
| 3 | 3 | Joen Baagi | 1 | |
| 4 | 4 | Joen Thørnesen | 3 | |
| 5 | 5 | David Andersen | $3^1/_2$ | 9 u. óðb. í Streymoy |
| 6 | 6 | Hillebrandt Sifuords. | 1 | |
| 7 | 7 | Oluf Simensen | 1 | |
| 8 | 8 | Marianne Jensdatter | $^1/_2$ | |

Her kann eingin lækking gerast, tessvegna eru framvegis 8 kongsbøndur.

## Óðalsböndur í Nólsoy 1584:

(Jarðabókin vísir 8 kontoir)

*Freeholders in Nólsoy in 1584.*

| B | A | | C |
|---|---|---|---|
| ÷ | 1 | Mads Andersen | 11 u. óðb. í Streymoy, við upps. |
| ÷ | 2 | Joen Sivertsen | 22 o. fl. u. kb. í Str.-oy, við upps. |
| 1 | 3 | Frands Joensen | |
| 2 | 4 | Peder Eriksen | |
| 3 | 5 | Gregorius Harrildsen | |
| 4 | 6 | Thomes Lambridsen | |
| 5 | 7 | Hans Jensen | |
| 6 | 8 | Rasmus Jensen | |

Úrslitið av lækkingini verður:
6 »verunligir« óðalsbøndur, 2 uppsitarar = 8 uppihaldarar.

Uppihaldarar í Nólsoy:
*(Maintainers in Nólsoy)*

Kongsbøndur 8, óðalsbøndur 6, uppsitarar 2 = 16.

Kongsböndur í Hesti og Koltri 1584 og jörð teirra:
(Jarðabókin vísir 6 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Hestur and Koltur in 1584.*

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Hestur | 1 | 1 | Anders Dognildsen | $2^1/_2$ | |
| | 2 | 2 | Østen Trundisen | $2^1/_2$ | |
| | 3 | 3 | Holden Joensen | 1 | |
| | 4 | 4 | David Joensen | 1 | |
| Koltur | 5 | 5 | Sacharias Joensen | 8 | |
| | 6 | 6 | Niels Thorbjørnsen | 8 | |

Her kann eingin lækking gerast, tessvegna eru framvegis 6 kongsbøndur.

Hvørki í Hesti ella Koltri síggjast óðalsbøndur at vera í 1584.

## Kongsböndur í Eysturoy 1584 og jörð teirra:

(Jarðabókin vísir 95 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Eysturoy in 1584.*

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Eiði | 1 | 1 | Børge Joensen | 2 | |
| | 2 | 2 | Oluf Thomesen | 1 | 82 |
| Funn- | 3 | 3 | Niels Gutormsen | ¼ | |
| ingur | 4 | 4 | Blasius Harildsen | ¼ | |
| | 5 | 5 | Bastian Ellingsen | ½ | |
| | 6 | 6 | Silvester Ellingsen } | ¼ | |
| | 7 | 7 | Augustinus Ellings. } | | |
| | 8 | 8 | Ellarius Olufsen | ½ | |
| Elduvík | 9 | 9 | Poul Joensen | 14¼ | |
| | ÷ | 10 | Joen Heinesen | 1⅝ | 52, 53, 54, 55 o. fl., við |
| | 10 | 11 | DominicusAntoniuss. | 1⅝ | uppsitara |
| | ÷ | 12 | Magnus Andersøn på | | 31 u. kb. í Suðuroy, |
| | | | Suderø | 1 | v. uppsitara |
| Oyndar- | ÷ | 13 | Hr. Torluf Gregersen | 5½ | við uppsitara |
| fjørður | 11 | 14 | Syrre Andersdatter } | 1½ | |
| | 12 | 15 | Oluf Augustinussen } | | 17 |
| | 13 | 16 | Anne Joens Datter | 3 | |
| | ÷ | 17 | Oluf Augustinussen | 1½ | 15 |
| | 14 | 18 | Joen Nielsen | 1 | |
| | 15 | 19 | Justinus Joensen | 2 | 41 |
| | ÷ | 20 | Torluf Gregersen[26] | 11½ | benef. f. próstin, við uppsitara |
| Fugla- | 16 | 21 | Karl Fabisen } | | |
| fjørður | 17 | 22 | Jacob Fabisen } | 5 | |
| | 18 | 23 | Niels Fabisen } | | |
| | 19 | 24 | Oluf Ellingsen } | | |
| | 20 | 25 | Joen Ellingsen } | | |
| | 21 | 26 | Staffen Ellingsen } | 1 | |
| | ÷ | 27 | Joen Olufsen } | | 57, óðb. 1 |
| | 22 | 28 | Gudeloch Nielsen } | | |
| Lorvík | 23 | 29 | Oluf Nielsen | 6 | 30 |
| | ÷ | 30 | Oluf Nielsen | 7½ | 29 |
| | 24 | 31 | Anders Olufsen | 3 | |
| | 25 | 32 | Simon Hendriksen | 2 | |
| | 26 | 33 | Joen Børgesen | 1 | |
| | 27 | 34 | Oluf Eriksen | 5½ | |
| | 28 | 35 | Nicolaus Hendriksen | 2 | |
| Norðra- | 29 | 36 | Niels Tormodsen | 5 | 42 |
| gøta | 30 | 37 | Oluf Sivertsen | 1½ | 43, óðalsb. 18, eisini 3 u. óðb. í Streymoy |
| | 31 | 38 | Simen Joensen | 2 | |

[26]) Tá prósturin hevði bústað á Nesi, hevur hann havt uppsitara á próstagarðinum í Oyndarfirði.

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðra-gøta | 32 | 39 | Gregorius Andersen | $6\frac{1}{4}$ | |
| | 33 | 40 | Anders Albridsen | $5\frac{1}{4}$ | 49 |
| | ÷ | 41 | Justinus Joensen | | 19 |
| | ÷ | 42 | Niels Tormodsen | $1\frac{1}{2}$ | 36 |
| | ÷ | 43 | Oluf Sivordsen | 1 | 37 |
| Gøtu-gjógv | 34 | 44 | Poul Andbjørnsen | 6 | |
| | 35 | 45 | Morten Nielsen | | |
| Syðra-gøta | 36 | 46 | Gutti Andersen | 19 | |
| | 37 | 47 | Oluf Christoffersen | | |
| | 38 | 48 | Nicolaus Sivertsen | | |
| | ÷ | 49 | Anders Albridsen | $\frac{3}{4}$ | 40 |
| | 39 | 50 | Christoffer Albridsen | $3\frac{1}{4}$ | |
| | 40 | 51 | Bertel Christoffersen | $2\frac{1}{4}$ | |
| Søldar-fjørður | ÷ | 52 | Joen Heinesen[27] | 13 | 10, 53, 54, 55 o.fl., við uppsitara |
| Lambi | 41 | 53 | Joen Heinesen[27] | 8 | 10, 52, 54, 55, 61, 68, 81, 86 |
| | ÷ | 54 | Joen Heinesen[27] | 21 | 53 o. fl. |
| Glyvrar | ÷ | 55 | Joen Heinesen[27] | 6 | 53 o.fl., við upps. |
| | 42 | 56 | Antonius Joensen | 5 | |
| | 43 | 57 | Joen Olufsen | 5 | 27, óðalsb. 1 |
| Toftir | 44 | 58 | Oluf Gutormsen | $3\frac{1}{2}$ | 66 |
| | 45 | 59 | Michel Nielsen | $\frac{1}{2}$ | 62, 67 |
| | 46 | 60 | David Joensen | 3 | |
| | ÷ | 61 | Joen Heinesen[27] | $\frac{1}{2}$ | 53 o.fl. |
| | ÷ | 62 | Michel Nielsen | | 59, 67 |
| | 47 | 63 | Laurids Thorkildsen | 4 | |
| | 48 | 64 | Christoffer Joensen | $1\frac{1}{2}$ | |
| | 49 | 65 | Oluf Persen | $1\frac{1}{2}$ | |
| | ÷ | 66 | Oluf Gutormsen | $\frac{1}{2}$ | 58 |
| | ÷ | 67 | Michel Nielsen | $\frac{1}{2}$ | 59, 62 |
| | ÷ | 68 | Joen Høgnesen[27] | $\frac{1}{2}$ | 53 o. fl. |
| | 50 | 69 | Oluf Joensen | $\frac{1}{2}$ | 73, 76 |
| Nes | 51 | 70 | Hr. Thorluf Gregersen[28] | 24 | prestag., benefic. |
| Strendir | ÷ | 71 | Hendrik Joensen | $2\frac{3}{4}$ | 94, við upps. |
| | 52 | 72 | Sivard Olufsen | 4 | 78 |
| | ÷ | 73 | Oluf Joensen | 4 | 69, 76 |
| | 53 | 74 | Jacob Olufsen | | 79, 83 |

[27]) Jón Heinason, hálvbróður Magnus Heinasonar, var størsti ognarmaður oyggjanna um hetta mundið. Umframt festigóðsið í Eysturoy (tils. $51\frac{7}{8}$ mk.) hevði hann jörð í Streymoy (2 mk.; nr. 42, rað A, s. 22), Sandoy ($1\frac{1}{4}$ mk.; nr. 20, rað A, s. 15) og Norðuroyum ($12\frac{3}{4}$ mk.; nr. 8 og 10, rað A, s. 30) — íalt $67\frac{7}{8}$ mk. Hann hevði verið lögmaður 1571—83, tá Kristoffer Valkendorf koyrdi hann frá.

[28]) Prestur í Eysturoy 1583—1625 og í sama tíðarskeiði Föroya próstur. Umframt prestagarðinum á Nesi sat hann sum próstur við $11\frac{1}{2}$ mk. í Oyndarfirði (nr. 20, rað A, s. 26; sb. viðm. 26).

| | B | A | | mk. | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Strendir | 54 | 75 | Claus Nielsen | 5½ | |
| | ÷ | 76 | Oluf Joensen } | 2 | 69, 73 |
| | 55 | 77 | Jacob Joensen } | | 88 |
| Skáli | ÷ | 78 | Sivert Olufsen | 2 | 72 |
| | ÷ | 79 | Jacob Olufsen | 2 | 74, 83 |
| | 56 | 80 | Thomas Trundsen | 1 | 87 |
| | ÷ | 81 | Joen Heinesen } | | 53 o. fl. |
| | ÷ | 82 | Oluf Thomesen } | | 2 |
| | ÷ | 83 | Jacob Olufsen } | 2 | 74, 79 |
| | 57 | 84 | Peder Olufsen } | | |
| | 58 | 85 | Joen Pedersen | 1 | |
| | ÷ | 86 | Joen Heinesen[27]) | 1 | 53 o. fl. |
| | ÷ | 87 | Thomas Trundsen } | 2½ | 80 |
| | ÷ | 88 | Jacob Joensen } | | 77 |
| Selatrað | 59 | 89 | Hr. Euden Andersen[29]) | 5½ | 2 u. óðb. í Streymoy, óðb. 19 |
| | 60 | 90 | Christoffer Olufsen | 2½ | |
| | 61 | 91 | Peder Hendriksen | 6 | 92 |
| | ÷ | 92 | Peder Hendriksen | 4 | 91 |
| | 62 | 93 | Barnabas Olufsen | 4 | |
| | 63 | 94 | Hendrik Joensen | 12 | 71, óðalsb. 22 |
| | 64 | 95 | Per Jacobsen | ½ | |

Úrslitið av lækkingini verður:

64 kongsbøndur, 7 uppsitarar = 71 uppihaldarar.

[29]) Fyrrverandi prestur í Eysturoy og próstur oyggjanna, nevndur »gamli próstur«. Eisini óðalsb. í Streymoy (nr. 2, rað A, s. 23).

## Óðalsböndur í Eysturoy 1584.

(Jarðabókin vísir 29 kontoir)

*Freeholders in Eysturoy in 1584.*

| | B | A | | C |
|---|---|---|---|---|
| Eiði | ÷ | 1 | Joen Olufsen | 27, 57 u. kgsb, kanska |
| | 1 | 2 | Hans Persen Fønbø | [við uppsitara |
| | 2 | 3 | Holden Augustinuss. | |
| | 3 | 4 | Poul Todtsen | |
| | 4 | 5 | Gutrum Olufsen | |
| | 5 | 6 | Anders Børgesen | |
| | 6 | 7 | Jacob Nielsen | |
| Funningur | 7 | 8 | Trond Harrildsen | |
| | 8 | 9 | Clemend Persen | |
| | 9 | 10 | Joen Jacobsen | |
| Gjógv | 10 | 11 | Oluf Thorbjørnsen | |
| | 11 | 12 | Anders Harrildsen | |
| | 12 | 13 | Niels Gutormsen | |
| | 13 | 14 | Albridt Augustinuss. | |
| | 14 | 15 | Holden Augustinuss. | |
| | 15 | 16 | Abraham Olufsen | |
| Oyndarfjørð. | 16 | 17 | Antonius Joensen | |
| Fuglafjørður | ÷ | 18 | Oluf Sivordsen | 37, 43 u. kongsb. |
| | ÷ | 19 | Hr. Euden Andersen | 89 u. kb., v. upps. |
| Toftir | 17 | 20 | Sivordt Eriksen | |
| | 18 | 21 | Ellender Gundersen | |
| | ÷ | 22 | Hendrik Joensen | 71, 94 u. kb. |
| | 19 | 23 | Philippus Gregersen | |
| Strendir | 20 | 24 | Laurids Ellingsen | |
| | 21 | 25 | Joen Hendriksen | |
| Skáli | 22 | 26 | Mourids Joensen | |
| | 23 | 27 | Gutorm Roffesen | 29 |
| | 24 | 28 | Oluf Madsen | |
| | ÷ | 29 | Gutorm Roffesen | 27 |

Úrslitið av lækkingini verður:

24 »verunligir« óðalsbøndur, 2 uppsitarar = 26 uppihaldarar.

Uppihaldarar í Eysturoy:

*(Maintainers in Eysturoy)*

Kongsbøndur 64, óðalsbøndur 24, uppsitarar 9 = 97.

# Kongsböndur í Norðuroyum í 1584 og jörð teirra.

(Jarðabókin vísir 53 kontoir)

*Tenants of the Danish Crown in Norðuroyar in 1584.*

## Borðoy.

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðuri í Vági | 1 | 1 | Poul Ellingsen | 4 | |
| | 2 | 2 | Oluf Olufsen | $6^3/_4$ | óðalsb. 6 |
| | 3 | 3 | Joen Olesen | $6^3/_4$ | |
| | 4 | 4 | Halduor Nicolausen | $6^3/_4$ | |
| | ÷ | 5 | Hr. Hans Jørgensen Fønbo[30]) | 2 | 9, 37: við 1 uppsitara her og á 9 |
| | 5 | 6 | Joen Nicolausen | $1^1/_2$ | óðalsb. 17 |
| | 6 | 7 | Erik Joensen | 2 | |
| | ÷ | 8 | Joen Heinesen | $2^3/_4$ | 53 o.fl. Eysturoy, v. u. |
| | ÷ | 9 | Hr. Hans Fønbo[30]) | 7 | 5, 37 |
| Árnafjørður | ÷ | 10 | Joen Heinesen | 10 | 8, við upps. |
| Skálatoftir | 7 | 11 | Simon Nicolausen | $^3/_4$ | |
| Múli | 8 | 12 | Joen Clemendsen | $1^3/_4$ | |
| Depil | 9 | 13 | Niels Olufsen | $1^1/_2$ | |
| Norðtoftir | ÷ | 14 | Justinus Joensen | $^1/_2$ | 34, 44, við upps. |

## Kalsoy.

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Húsar | 10 | 15 | Joen Jacobsen | $3^1/_2$ | |
| | 11 | 16 | Antonius Joensen | 3 | |
| | 12 | 17 | Poul Thordsen | 2 | |
| Blankaskáli | 13 | 18 | Sivard Arendsen | } $5^1/_4$ | |
| | 14 | 19 | Anders Barnabasen | | |
| | 15 | 20 | Anders Nicolausen | | |
| | ÷ | 21 | Jørgen Olufsen | | 23 |
| Mikladalur | 16 | 22 | Nicolaus Hendriksen | 7 | óðalsb. 15 |
| | 17 | 23 | Jørgen Olufsen | $2^1/_4$ | 21 |
| | 18 | 24 | Oluf Poulsen | 1 | |
| | 19 | 25 | Sivordt Andersen | $^1/_2$ | |
| Trøllanes | 20 | 26 | Anders Olufsen | 6 | |
| | 21 | 27 | Brynell Joensen | $5^1/_4$ | |

30) Tá presturin hevði bústað á Viðareiði, hevur hann havt (1) uppsitara fyri bæði festini norðuri í Vági.

## Kunoy.

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Kunoy | 22 | 28 | Melcher Hendriksen | ? | ikki viðmerkt |
| | ÷ | 29 | Melcher Hendriksen | 2½ | 28, 51 |
| | 23 | 30 | Joen Olufsen | 2½ | |
| | 24 | 31 | Melcher Trundisen | ¼ | |
| Haralds-sund | 25 | 32 | Laurids Joensen | 9 | |
| Skarð | 26 | 33 | Joen Thyssen | 1¼ | |

## Viðoy.

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Viðareiði | 27 | 34 | Justinus Joensen | 16 | 14, 44, 46, 48 |
| | ÷ | 35 | Simon Joensen | 8 | 39, við upps. |
| | 28 | 36 | Niels Joensen | 4 | |
| | 29 | 37 | Hr. Hans Fønbo[31] | 16 | 5, 9, herav 12 merkur benef. sum prestag. |
| Hvanna-sund | 30 | 38 | Hendrik Nielsen | 8 | |
| | 31 | 39 | Simon Joensen | 8 | 35 |

## Svínoy.

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| | 32 | 40 | Joen Septensen | 4 | |
| | 33 | 41 | Søren Simensen } | 3 | |
| | 34 | 42 | Bertel Simensen } | | |
| | 35 | 43 | Albert Joensen } | 3 | |
| | ÷ | 44 | Justinus Joensen } | | 14, 34, 46, 48 |
| | 36 | 45 | Jacob Eudensen | 4 | |

## Fugloy.

| | B | A | | mk | C |
|---|---|---|---|---|---|
| Kirkja | ÷ | 46 | Justinus Joensen | 2½ | 14, 34, 44, 48 |
| | 37 | 47 | Joen Jørgensen | ½ | |
| Hattar-vík | ÷ | 48 | Justinus Joensen | 8 | 14, 34, 44, 46, v. upps. á 46 og 48 |
| | 38 | 49 | Harrild Høgnesen | 3 | |
| | 39 | 50 | Joen Michelsen | 2½ | |
| | ÷ | 51 | Melcher Hendriksen | 2½ | 28, 29, við upps. |
| | 40 | 52 | Anders Olufsen | 3 | óðalsb. 9 |
| | 41 | 53 | Michel Harrildsen | 5½ | óðalsb. 23 |

Úrslitið av lækkingini verður:

41 kongsbøndur, 7 uppsitarar = 48 uppihaldarar.

[31]) Prestur í Norðuroyum 1584—1624/25.

# Óðalsböndur í Norðuroyum 1584.

(Jarðabókin vísir 24 kontoir)

*Freeholders in Norðuroyar in 1584.*

## Borðoy.

| | B | A | | C |
|---|---|---|---|---|
| Norðuri í Vági | 1 | 1 | Joen Poulsen | |
| | 2 | 2 | Erlender Eriksen | |
| | 3 | 3 | Joen Michelsen | |
| | 4 | 4 | Ingeborg Trundedatter | |
| | 5 | 5 | Jens Joensen | |
| | ÷ | 6 | Oluf Olufsen | 2 u. kongsb. |
| | 6 | 7 | Nicolaus Olufsen | |
| | 7 | 8 | Holdan Olufsen | |
| | ÷ | 9 | Anders Olufsen | 52 u. kb., v. upps. |

## Kalsoy.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Húsar | 8 | 10 | Magnus Gutormsen | |
| | 9 | 11 | Hendrik Gutormsen | |
| | 10 | 12 | Lastica Joensdatter | |
| | 11 | 13 | Antonius Joensen | |

## Kunoy.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Kunoy | 12 | 14 | Skofdrof Villumsen | |
| | ÷ | 15 | Nicolaus Hendriksen | 22 u. kb.; við upps. |
| | 13 | 16 | Ismael Poulsen | |
| Skarð | ÷ | 17 | Joen Nicolausen | 6 u. kb.; við upps. |
| | 14 | 18 | Oluf Thomissen | |
| | 15 | 19 | Sylvester Joensen | |
| | 16 | 20 | Jørgen Joensen | |

## Borðoy.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Múli | 17 | 21 | Blasius Andbjørnsen | |
| | 18 | 22 | Anders Clemendsen | |

## Fugloy.

| | B | A | | C |
|---|---|---|---|---|
| Kirkja | ÷ | 23 | Michel Harrildsen | 53 u. kongsb. |
| | 19 | 24 | Mogens Heinesen[32]) | |

Úrslitið av lækkingini verður:

19 »verunligir« óðalsbøndur, 3 uppsitarar = 22 uppihaldarar.

Uppihaldarar í Norðuroyum:
*(Maintainers in Norðuroyar)*
Kongsbøndur 41, óðalsbøndur 19, uppsitarar 10 = 70.

---

Lækkingarúrslitini undir einum geva hetta yvirlit yvir uppihaldarar:

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | (kongsb. | 45, | óðalsb. | 28, | uppsitarar | 7) | 80 |
| Sandoy og St. Dímun | ( — | 23 | — | 22 | — | 2) | 47 |
| Skúvoy | ( — | 6 | — | 2 | — | 0) | 8 |
| Mykines | ( — | 6 | — | 7 | — | 0) | 13 |
| Vágar | ( — | 20 | — | 5 | — | 2) | 27 |
| Streymoy | ( — | 47 | — | 7 | — | 18) | 72 |
| Nólsoy | ( — | 8 | — | 6 | — | 2) | 16 |
| Hestur | ( — | 4 | — | 0 | — | 0) | 4 |
| Koltur | ( — | 2 | — | 0 | — | 0) | 2 |
| Eysturoy | ( — | 64 | — | 24 | — | 9) | 97 |
| Norðuroyar | ( — | 41 | — | 19 | — | 10) | 70 |

Tilsamans 436 uppihaldarar.
(*Total number of maintainers after reduction*).

---

[32]) Er kanska hin gitni Magnus Heinason, men ikki avgjört; um so, hevur uppsitari verið á garðinum.

Lata vit nú hesar umboða hvör sítt húski (tænastufólk ikki roknað uppí) við 5 fólkum[33]) í hvörjum, fáa vit: 436 . 5 = 2180 persónar hoyrandi beinleiðis til böndurnar (kongs- og óðalsböndur (+ aðalsböndur) við uppsitarum) og prestarnar.

Böndurnir vóru »tey stóru« í samfelagnum. Var ein av bóndaætt, visti væl við hjá honum; men var ein tað ikki, stóð honum ikki nógv í boði í lívinum. Traðarmenn verða ikki nevndir um hetta mundið (og eisini longri upp í tíðina eru tílíkir ógvuliga sjáldsamir); annaðhvört var ein bóndi

[33]) Í eini meting av fólkatalinum í Malmö í árunum 1517—19 nýtir C. Sonnenstein Wendt hetta tal og sigur tað vera tað vanligast nýtta miðaltal fyri eitt skattaborgarahúski (hjún og 3 börn) í teirri tíðini (Ny Kirkehist. Saml. II, viðm. 4, s. 130). — Störri tal man ið hvussu er ikki vera ráðiligt at nýta fyri Föroyar fyri hesa tíð; tí innan fyri búskaparligu rammur landsins var ikki ráð til nakran týðandi fólkatilvökstur, og hevur fólk tí trúligt við vilja víst afturhald í hesum, eins og hjúnaband millum ognarleys beinleiðis var bannað heilt upp til 1846 (sb. viðm. 35). Jörgen-Frantz Jacobsen tekur til: »Bonden kunde ikke önske sig mere end nogle faa Börn, og for Tyendets Vedkommende önskede han slet ingen; thi hvem skulde ernære dem?« (Færöerne, Natur og Folk, s. 46). — Enn um 200 ár seinri, í 1801, tykist eitt húski við 5 persónum í miðal at hava verið vanligt — soleiðis t. d. í Hesti: 11 húski — 55 fólk, Velbastaður: 11 h. — 53 f., Nólsoy: 19 h. — 100 f., Kaldbak: 12 h. — 66 f., Kollafjörður 26 h. — 134 f., Streymnes: 5 h. — 25 f., Vík: 13 h. — 60 f., Vestmanna: 22 h. — 126 f., Kvívík: 23 h. — 97 f., Miðvágur: 36 h. — 145 f., Sandavágur: 23 h. — 110 f., Böur og Gásadalur: 13 h. — 66 f., Mykines: 17 h. — 75 f., Funningur: 14 h. — 58 f., Eiði: 30 h. — 122 f., Fuglafjörður: 24 h. — 128 f.

Talva, ið fyri hvørja sýslu og fyri allar oyggjarnar undir einum vísir miðaltalið fyri hvørt húski í 1801 (arbeiðisfolk uppíroknað):

| Sýsla | Fólkatal | Talið á húskjunum | Miðaltalið fyri hvørt húski |
|---|---|---|---|
| Suðuroyar | 775 | 144 | 5,4 |
| Sandoyar | 466 | 91 | 5,1 |
| Vága | 482 | 108 | 4,5 |
| Streymoyar | 1677 | 326 | 5,1 |
| Eysturoyar | 1214 | 253 | 4,8 |
| Norðuroya | 643 (642) | 120 | 5,4 |
| Alt landið | 5257 | 1042 | 5,0 |

ella ognarleysur. Og hesir seinastu hövdu einki annað í at velja enn at fara í breyð bóndanna. Á henda hátt hevði hvör störri bóndagarður sítt arbeiðisfólk av arbeiðiskonum og húsköllum. — Talið á hesum er ógvuliga torfört at meta um, tí frá sjálvari tíðini finst einki at miða seg eftir. Væl nevnir Lucas Debes[34]) fyri prestagarðarnar á hansara tíð (um 1670), at rakstur teirra krevur í minsta lagi 5—6 húskallar og eins nógvar arbeiðiskonur. Men hetta hjálpir lítið í hesum föri, tí fyri tað fyrsta vóru prestagarðarnir ólíkir til stöddar, og tínæst fáa vit ikki at vita, um hann bert hevur teir garðarnar í huga, sum prestarnir aftan á trúbótina hövdu fingið sum viðbót til ta í sær sjálvum ov lítlu embætislönina, ella hann tekur hesar og teir »annexgarðarnar«, sum teir hövdu fingið afturat í 1632, undir einum — um tað sostatt er ein 16 marka garður (egni embætisgarður hansara, Syðridalur — nr. 19, Streymoy, rað A, s. 21, — sum hann óivað hevur havt í huga við ættleiðingini) ella ein 21 marka garður (sami garður eftir í 1632 at hava fingið eitt 5 marka »annex« afturat), sum hevur havt minst 10—12 tænastufólk. Harafturat er væl hugsandi, at prestarnir vegna tess at teir bert vórðu álagdir skatt, tá teir umframt vóru festarar ella óðalsböndur, og prestajörðin jú var gjaldfrí (beneficerað), hava kunnað loyvt sær eitt störri fólkahald enn böndurnir. — Heldur ikki nökur av teim munnliga varðveittu frásögnunum um hendingar frá teirri tíðini geva okkum nakað at halda um.

Tað mest hóskandi at ganga út frá viðvíkjandi eini meting av talinum av arbeiðisfólkinum man tí fara at vera áðurnevnda virðismeting av jörðini. Eftir hesi eru Föroyar mettar til um 2400 merkur; ætla vit nú, at til raksturin av 3 merkrum krevst sum eykamanning 1 persónur (tikið í miðal), verður hetta um 800 persónar til tær um 2400 merkurnar. —

Ein gjöllari frágreiðing má til, hví júst 3 merkur í miðal

34) Í »Færoæ et Færoa reserata«, s. 287.

eru tiknar sum grundarlag fyri eini meting av tænastufólkatalinum. Tá á dögum og leingi eftir tað varð alt, ein bóndi hevði at gjalda, mest goldið við tí, ið garðurin gav av sær (»in natura«, naturalökonomi) — ull, vaðmal, hosur, smör, tálg o. s. fr. Harafturat skuldu öll á garðinum fyri stóran part föðast og klæðast av tí, ið garðurin gav. Undir hesum umstöðum hevur ein garður undir 3 merkur neyvan kunnað borið seg við föstum arbeiðisfólki — ið hvussu er ikki eitt festi, sum umframt skattin eisini hevði jarðarleigu seyðaleigu o. s. fr. at gjalda av egnum úrdráttum til ríkið (ella tær tvær nevndu aðalsættirnar), harumframt tíggjund til kirkjuna og prestarnar (skatt og tíggjund) eins og óðalsböndurnir). — Eisini eru upp til 3 merkur ið hvussu er ikki meir enn eitt húski av nevndu stödd (5 fólk) hevur kunnað klárað raksturin av einsamalt uttan föst arbeiðisfólk — kann vera við hjálp frá grannunum móti hjálp afturfyri, tá umráddi. — Til stuðul fyri hesa ætlan um 1 persón sum eykamanning til raksturin av 3 merkrum, kann fólkatalið á Stóru Dímun 1801 verða nýtt. Stóra Dímun var — og er — 1 kongsfesti, 13 merkur. Eftir fólkateljingini 1801 (onnur fólkateljingin í Föroyum, men fyrsta, ið nýtt kann verða til hagfröðislig endamál) vóru 13 fólk á oynni. Halda vit okkum til áðurnevnda miðaltal fyri eitt bóndahúski (uttan tænastufólk), 5 persónar, verða 8 gentur og húskallar eftir. Við fjarstöðu samfelagsins á Stóru Dímun í huga, kann hugsast, at tann neyðturviliga fólkanögdin til raksturin av garðinum hevur verið tök. Og 8 tænastufólk kunnu júst hugsast at hava verið neyðug til raksturin av einum 13—20 marka garði eins væl um 1600 og í 1801 — kanska tó í störra lagi, tá vit minnast til tað, sum áður er nevnt fyri Stóru Dímun og at hetta samfelag sostatt ikki hevur kunnað litið á hjálp frá öðrum, tá tað galt. Hetta verða sostatt 8 tænastufólk til 13 merkur, um 1,85 fólk til 3 merkur.

Men nú vita vit eisini aðrastaðni frá (Sunnbæ t.d. í seinra helmingi av 19 öld), at 4—5 marka garðar eingi tænastu-

fólk hava havt. Tí man sum miðal 1 persónur til 3 merkur fara at vera ein toluliga tökur miðalvegur.

Tvey viðurskifti eru tó eftir enn at hava í huga. Annað er, at hjúnabond millum arbeiðisfólk ikki eru óhugsandi — hóast hetta óivað ikki hevur verið vanligt[35]) vegna tess at tvey ognarleys sjálvsagt ikki kunnu hava havt nógv at stovna hjúnaband á og at vit í jarðabókunum eisini finna listar yvir bötur (»sagefaldslister«) álagdar arbeiðisfólkum fyri at vera komin fyri leysingabörn — óivað í nógvum förum tí at tey ikki sluppu at giftast. — Hitt at hava í huga eru tey gomlu, ið hava sitið við haldi. — Tí kann talið fyri tænastufólkini (800) kanska snöggast til 1000 fyri tænastufólk og haldfólk undir einum.

Fólkatal Föroya um ár 1600 verður sostatt:

*(Size of population about 1600)*

| | |
|---|---|
| Kongs- og óðalsböndur og prestarnir: | um 2180 |
| *(Tenants, freeholders, and clergy)* | |
| Tænastufólk og haldfólk: | um 1000. |
| *(Farm workers, male and female, and pensioners)* | |
| Tilsamans | um 3180 |

Sjálvsagt kann ein rokning av fólkatalinum við einans jarðabókunum sum grundarlag ongantíð verða annað enn ein meting, ið rillar meira ella minni. Men so leingi meira eftirfarandi keldutilfar ikki er fyri hond, mugu vit sláa okkum til tols við tí úrsliti, ið her er náað, — og eina hylling fáa vit hóast alt á tali fedra okkara um ár 1600.

---

[35]) Upp til 1846 var hjúnaband bannað millum ognarleys (sb. J.-F. Jacobsen: Færöerne, Natur og Folk, s. 46), men eins og vit finna dömi um tað seinri, kunnu undantök eisini hava verið í hesi tíð. Tað er heldur ikki óhugsandi, at summir húskallar hava átt nakað av óðalsjörð, sum kanska hevur verið heldur lítið til sjálvstöðugan garð, og hava teir sostatt verið noyddir at vera í tænastu, men kortini ikki sum ognarleysir.

## II. OGNARBÝTINGIN

Föroyar vóru, sum áður nevnt, viðvíkjandi markatali mettar til 2406 merkur 12 gyllin 5 skinn. — Markatalið á kongsjörðini fyri seg í 1584 kunnu vit nú finna við at telja tey í fyrra tátti nevndu töl fyri stöddina á teim einstöku kongsgörðunum saman. Úrslitið av hesum verður: 1273 mk. 4 gl. (festijörð: 1145 mk. 2 gl. + beneficerað jörð: 128 mk. 2 gl.). Eftir verða: 1133 mk. 8 gl. 5 sk., sum er óðalsjörð. Vit síggja, at í 1584 hava óðalsböndurnir sitið við nærum sama markatali, sum kongsböndurnir.

Viðvíkjandi býtingini av jörðini millum teir einstöku böndurnar vildi tað nú verið áhugavert, um ein slík kundi verið uppgjörd fyri bæði kongsböndur og óðalsböndur. Men hetta er tíverri ikki gjörligt. Tað er bert stöddin á teim einstöku *kongsfestunum*, vit fáa nakað at vita um úr jarðabókunum. Hesar eru jú fyrst og fremst ein listi yvir kongsgóðsið og nevna einki um óðalsgóðsið — óðalsböndurnir eru bert nevndir við skattinum, teimum var álagdur til ríkið, og út frá honum er ikki gjörligt at hugsa sær nakað um stödd teirra einstöku óðalsbúgv. Heldur ikki aðrastaðni eru upplýsingar at fáa hesum viðvíkjandi. Tí kann ein roynd at kanna ognarbýtingina bert verða gjörd gjöllari fyri kongsböndurnar, meðan vit fyri óðalsböndurnar mugu sláa okkum til tols við at fáa at vita, hvussu mangir teir undir einum hava verið um tær u. 1133 merkurnar í 1584.

Fylgjandi yvirlit er sostatt við nevndu avmarking ætlað at vísa ognarbýtingina sum hon myndar seg eftir jarðabókini 1584. Tað högligasta her er at seta teir kongsböndur fyri seg, ið bert vóru hetta, teir fyri seg, ið umframt hövdu óðalsgóðs og endiliga teir »verunligu« óðalsböndurnar (sum einans vóru hetta) fyri seg.

## Ognarbýtingin fyri Suðuroy 1584.

*Division of landed property in Suðuroy in 1584.*

1. Einans kongsbøndur:

| nr. | mk. | nr. | mk. | nr. | mk. |
|---|---|---|---|---|---|
| 1[36] | $8^1/_2$[37] | 16 | $^1/_2$ | 30 | $^3/_4$ |
| 2 | $^1/_4$ | 17 | $^1/_2$ | 31 | $^3/_4$ |
| 3 | $^1/_4$ | 18 | $^1/_2$ | 32 | 1 |
| 5 | $^1/_2$ | 19 | $7^1/_2$ | 33 | $^1/_2$ |
| 6 | $^1/_3$ | 20 | $2^1/_2$ | 34 | $5^3/_8$ |
| 7 | $^1/_3$ | 21 | $^1/_2$ | 35 | 2 |
| 8 | $^1/_3$ | 22 | $^3/_4$ | 36 | $1^5/_8$ |
| 9 | $^1/_3$ | 23 | $1^1/_2$[38] | 37 | $10^1/_4$ |
| 10 | $^1/_3$ | 24 | $^3/_4$ | 38 | $4^5/_8$ |
| 11 | $^1/_3$ | 25 | $^1/_3$ | 39 | $1^1/_2$ |
| 13 | 6 | 27 | $^1/_3$ | 40 | 1 |
| 14 | 3 | 28 | 8 | | |

Íalt 35 kongsbøndur við tilsamans $73^{13}/_{24}$ mk.

2. Kongs- og óðalsbøndur samstundis:

| nr. | mk. | nr. | mk. |
|---|---|---|---|
| 4 | $5^1/_2$ + óðb. | 42 | $^3/_5$ + óðb. |
| 12 | $^1/_2$ + óðb. | 43 | $1^{33}/_{80}$ + oðb. |
| 26 | $^1/_3$ + óðb. | 44 | $^3/_5$ + oðb. |
| 29 | $^3/_4$ + óðb. | 45 | $^3/_5$ + oðb. |
| 41 | $1^{33}/_{80}$ + óðb. | | |

Íalt 9 kongsbøndur + oðalsbøndur við tils. $11^{17}/_{24}$ mk.

3. Einans oðalsbøndur: 28.

Verða hesi töl nú skipað í bólkar, soleiðis at
*1. bólkur* rúmar teir böndur, ið einans eru kongsböndur við 1 mörk og minni *og* teir, ið umframt at vera kongsböndur av hesum slagi eru *óðalsböndur* samstundis;
*2. bólkur*, (einans) kongsböndur við 1 til 4 merkrum (4

---

[36]) Tölini í hesum raði svara til nummörini í *raði B* í fyrra tátti.
[37]) Hesi töl svara til tey í raðnum »mk.« í fyrra tátti.
[38]) Hesin festari, Magnus Andersen, var verunliga bert festari av ½ mk. her; hitt festið, 1 mk., lá í Eysturoynni (nr. 12, rað A, s. 26). Fyri at lætta um sundurbýtingina av festarunum í bólkar er hetta seinra festið tó tikið við undir Suðuroy.

mk. íroknaðar) *og* teir av hesum slagi, ið eru óðalsböndur samstundis;

*3. bólkur*, (einans) kongsböndur við meiri enn 4 merkrum *og* teir av hesum slagi, ið eru óðalsböndur samstundis;

*4. bólkur*, teir böndur, ið einans eru óðalsböndur, fáa vit sum úrslit:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Einans kongsbøndur við 1 mk. og minni | 22 |
| | Kongsb. og óðalsb. - 1 — - — | 6 |
| 2. | Einans kongsbøndur við 1 til 4 mk. | 6 |
| | Kongsb. og óðalsb. - 1 - 4 — | 2 |
| 3. | Einans kongsbøndur við meiri enn 4 mk. | 7 |
| | Kongsb. og óðalsb. - — - 4 - | 1 |
| 4. | Einans óðalsbøndur | 28 |

Verður tínæst markatalið hjá *kongsbóndunum* í hvörjum einstökum bólki gjört upp fyri seg, fæst:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1: | 28 | kongsb. | við tils. | $14^{11}/_{20}$ | mk. |
| Bólkur 2: | 8 | — | - - | $14^{19}/_{20}$ | - |
| Bólkur 3: | 8 | — | - - | $55^{3}/_{4}$ | - |

Tilsamans 44 kongsb. við tils $84^{1}/_{4}$ (+ 1 mk.)[39].

— og hjá *óðalsbóndunum:*

Bólkur 4: 38 (40) óðalsböndur (28 + tils. 9, ið »ganga aftur« frá hinum bólkunum + presturin, ið eisini er óðalsbóndi (nr. 6, rað A, s. 13), men sum, tí at hann er ikki einans hetta, ikki er tikin við í nökrum av bólkunum — og harumframt 2 óðalsböndur afturat, Peder Jacobsen (nr. 25, rað A, s. 13), sum tó var búsettur í Streymoy, og vágaprestur (nr. 15, rað A, s. 13)) við tilsamans $253\frac{3}{4}$ mk.[40]).

Aftur at hesum kemur tað gjaldfría (beneficeraða) góðsið, $12\frac{1}{2}$ mk. í Hvalbæ (prestagarðurin, nr. 16, rað A, s. 10) og $4^{5}/_{8}$ mk. suðuri í Vági (nr. 44 b, rað A, s. 11).

---

39) Festi Magnus Andersens í Eysturoy (sb. viðm. 38).

40) Markatalið í Suðuroy er (eftir Trap: Danmark) 368 mk. Tá vit frá hesum taka kongsgóðsið í 1584, ($84^{1}/_{4}$ mk. + $12^{7}/_{8}$ mk. (sb. viðm. 21) + beneficerað (gjaldfrítt) góðs, $17^{1}/_{8}$ mk. — íalt) $114\frac{1}{4}$ mk., verður óðalsgóðsið $253\frac{3}{4}$ mk.

## Ognarbýtingin fyri Sandoy, Skúvoy og St. Dímun 1584.

*Division of landed property in Sandoy, Skúvoy, and St. Dímun in 1584.*

1. Einans kongsbøndur:

| | | | | Skúvoy | |
|---|---|---|---|---|---|
| nr. | mk. | nr. | mk. | nr. | mk. |
| 2 | $2\frac{1}{4}$ | 13 | 24 | 1 | 8 |
| 3 | $7\frac{1}{4}$ | 14 | $\frac{5}{6}$ | 2 | $4\frac{3}{4}$ |
| 4 | $\frac{1}{8}$ | 15 | $1\frac{1}{3}$ | 3 | $4\frac{3}{4}$ |
| 5 | $\frac{1}{8}$ | 16 | $\frac{5}{6}$ | 4 | 1 |
| 6 | $\frac{1}{8}$ | 17 | 10 | 5 | $6\frac{1}{2}$ |
| 7 | $\frac{1}{8}$ | 18 | $1\frac{1}{4}$ | 6 | $5\frac{1}{2}$ |
| 8 | $\frac{1}{4}$ | 20 | 2 | | |
| 9 | 1 | 21 | 1 | | |
| 10 | $2\frac{1}{2}$ | 22 | $\frac{1}{2}$ | | |

Íalt 24 kongsbøndur við tilsamans 86 mk.

2. Kongs- og óðalsbøndur samstundis:

| | nr. | mk. | |
|---|---|---|---|
| | 11 | $4\frac{1}{2}$ + óðb. | |
| | 12 | 1 + óðb. | óðalsb. í Skúvoy |
| | 19 | 4 + óðb. | |
| St. Dímun | 1 | $14\frac{3}{4}$ + óðb. | 13 mk. her, $1\frac{3}{4}$ mk. í festi og óðalsb. í Sandoy |

Íalt 4 kongsbøndur og óðalsbøndur við tilsamans $24\frac{1}{4}$ mk.

3. Einans óðalsbøndur:

Sandoy 22, Skúvoy 2.

Verða tölini nú skipað í bólkar á sama hátt sum fyri Suðuroy, fæst:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Einans kongsbøndur | við 1 mk. og minni | 11 |
| | Kongs- og óðalsb. | — 1 — - — | 1 |
| 2. | Einans kongsbøndur | — 1 til 4 mk. | 5 |
| | Kongs- og óðalsb. | — 1 - 4 — | 1 |
| 3. | Einans kongsbøndur | — meiri enn 4 mk. | 8 |
| | Kongs- og óðalsb. | — — — 4 — | 2 |
| 4. | Einans óðalsbøndur | | 24 |

Verður tínæst markatalið hjá *kongsbóndunum* í hvörjum einstökum bólki gjört upp á sama hátt sum fyri Suðuroy, fæst:

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur | 1: | 12 | kongsb. | við tils. | $6^{11}/_{12}$ | mk. |
| — | 2: | 6 | — | — — | $13^{1}/_{3}$ | — |
| — | 3: | 10 | — | — — | 90 | — |

Íalt 28 kongsb. við tils. $110^{1}/_{4}$ mk.

— og hjá *óðalsbóndunum:*

Bólkur 4: 28 óðalsb. (24 + tils. 4 frá hinum bólkunum) við tilsamans $156^{3}/_{4}$ mk.[41]).

Aftur at hesum kemur tað gjaldfría góðsið, prestagarðurin (nr. 1, Sandoy, s. 15), 10 mk. — Tá presturin ikki kann verða tikin fyri festara av hesum og hvörki er festari ella ánari av aðrari jörð, er hann ikki tikin við omanfyri.

[41]) Markatalið í Sandoy + Skúvoy + St. Dímun er (Trap) $278^{1}/_{4}$ mk. Tá vit frá hesum taka kongsgóðsið í 1584 ($110^{1}/_{4}$ mk. + $1^{1}/_{4}$ mk. (sb. viðm. 27) + beneficerað góðs, 10 mk. — íalt) $121^{1}/_{2}$ mk., verður óðalsgóðsið $156^{3}/_{4}$ mk.

## Ognarbýtingin fyri Vágar og Mykines 1584.

*Division of landed property in Vágar and Mykines in 1584.*

1. Einans kongsbøndur:

| | | | | Mykines | |
|---|---|---|---|---|---|
| nr. | mk. | nr. | mk. | nr. | mk. |
| 1 | $1\frac{1}{2}$ | 12 | $1\frac{3}{4}$ | 1 | 1 |
| 2 | $2\frac{1}{4}$ | 13 | $1\frac{1}{4}$ | 2 | $\frac{1}{4}$ |
| 3 | $\frac{1}{4}$ | 14 | $1\frac{1}{4}$ | 3 | $1\frac{1}{4}$ |
| 4 | $\frac{3}{4}$ | 15 | $2\frac{1}{4}$ | 5 | $1\frac{7}{8}$ |
| 5 | $\frac{3}{4}$ | 16 | $1\frac{1}{4}$ | 6 | $\frac{3}{4}$ |
| 6 | $3\frac{1}{4}$ | 17 | 1 | | |
| 7 | $3\frac{1}{2}$ | 18 | 6 | | |
| 8 | $3\frac{1}{2}$ | 19 | 1 | | |
| 11 | $4\frac{3}{4}$ | 20 | 1 | | |

Íalt 23 kongsb. við tils. $42\frac{3}{8}$ mk.

2. Kongs- og óðalsbøndur samstundis:

| | nr. | mk. |
|---|---|---|
| | 9 | 3 + óðb. |
| | 10 | 6 + óðb. |
| Mykines | 4 | $1\frac{7}{8}$ + óðb. |

Íalt 3 kongs- og óðalsbøndur við tils. $10\frac{7}{8}$ mk.

3. Einans óðalsbøndur:

Vágar 5, Mykines 7.

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Einans kongsbøndur við 1 mk. og minni | 9 |
| | Kongs- og óðalsb. - 1 — - — | 0 |
| 2. | Einans kongsb. við 1 til 4 mk. | 12 |
| | Kongs- og óðalsb. - 1 - 4 — | 2 |
| 3. | Einans kongsb. við meiri enn 4 mk. | 2 |
| | Kongs- og óðalsb. - — - 4 — | 1 |
| 4. | Einans óðalsb. | 12 |

Markatalið hjá *kongsbóndunum* í hvörjum einstök. bólki:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1: | 9 kongsb. | við tils. | $6^3/_4$ mk. |
| — 2: | 14 — | - — | $29^3/_4$ — |
| — 3: | 3 — | - — | $16^3/_4$ — |

Íalt 26 kongsb. við tils. $53^1/_4$ mk.

— og hjá *óðalsbóndunum:*

Bólkur 4: 15 (16) óðalsböndur (12 + tils. 3 frá hinum bólkunum — og harafturat 1 óðalsbóndi, prósturin (nr. 6, rað A, s. 20), sum tó var búsettur í Eysturoy) við tils. 153½ mk.[42])

Aftur at hesum kemur tað gjaldfría góðsið, prestagarðurin (nr. 10, s. 19), 9½ mk., og lögmannsgarðurin (nr. 17, rað A, s. 19), 16 mk. — Tá presturin her eisini er festari av aðrari jörð og harumframt óðalsbóndi, er hann tikin við omanfyri.

[42]) Markatalið í Vágum + Mykinesi (Trap): 232¼ mk. Tá vit frá hesum taka kongsgóðsið í 1584, (53¼ mk. + benef. góðs, 25½ mk. — íalt) 78¾ mk., verður óðalsgóðsið 153½ mk.

## Ognarbýtingin fyri Streymoy, Nólsoy, Hest og Koltur 1584.

*Division of landed property in Streymoy, Nólsoy, Hestur, and Koltur in 1584.*

### 1. Einans kongsbøndur:

| nr. | mk. | nr. | mk. | | nr. | mk. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 5 | 22 | $21\frac{1}{4}$ | | 44 | 8 |
| 2 | 34[43]) | 23 | 3 | | 45 | 28 |
| 3 | 2 | 24 | $\frac{1}{2}$ | | 46 | 14 |
| 4 | 54[44]) | 25 | $\frac{3}{4}$ | | 47 | 9 |
| 5 | 8 | 26 | 2 | Nólsoy | 1 | $1\frac{1}{2}$ |
| 6 | 2 | 28 | $4\frac{3}{4}$ | | 2 | 1 |
| 7 | 2 | 29 | $4\frac{3}{4}$ | | 3 | 1 |
| 8 | 1 | 30 | $4\frac{3}{4}$ | | 4 | 3 |
| 9 | 1 | 31 | $4\frac{3}{4}$ | | 6 | 1 |
| 10 | 1 | 32 | $1\frac{1}{2}$ | | 7 | 1 |
| 11 | 9 | 33 | $1\frac{3}{4}$ | | 8 | $\frac{1}{2}$ |
| 12 | $10\frac{1}{2}$ | 34 | 5 | Hestur | 1 | $2\frac{1}{2}$ |
| 14 | 6 | 35 | $14\frac{1}{2}$ | | 2 | $2\frac{1}{2}$ |
| 16 | 1 | 36 | $12\frac{1}{2}$ | | 3 | 1 |
| 17 | $1\frac{1}{4}$ | 37 | 4 | | 4 | 1 |
| 18 | $\frac{1}{2}$ | 38 | $\frac{1}{2}$ | Koltur | 5 | 8 |
| 19 | $\frac{1}{2}$ | 41 | 4 | | 6 | 8 |
| 20 | 1 | 42 | 6 | | | |
| 21 | $1\frac{1}{4}$ | 43 | 8 | | | |

Íalt 55 kongsb. við tilsamans $336\frac{1}{4}$ mk.

### 2. Kongs- og óðalsbøndur samst.:

| | nr. | mk. |
|---|---|---|
| | 13 | $22\frac{1}{2}$ + óðb. |
| | 15 | $10\frac{1}{2}$ + óðb. |
| | 27 | 18 + óðb. |
| | 39 | $28\frac{1}{2}$ + óðb. |
| | 40 | 4 + óðb. |
| Nólsoy | 5 | $3\frac{1}{2}$ + oðb. |

Íalt 6 kongs- og oðalsb. við tils. 87 mk.

---

43) (sb. viðm. 20) Morten Jespersen.
44) (sb. viðm. 21) Peder Jacobsen.

3. Einans oðalsbøndur:

Streymoy 7, Nolsoy 6, Hestur 0, Koltur 0.

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Einans kongsbøndur við 1 mk. og minni | 17 |
| | Kongs- og óðalsb. — 1 — - — | 0 |
| 2. | Einans kongsbøndur — 1 til 4 mk. | 15 |
| | Kongs- og óðalsb. — 1 - 4 — | 2 |
| 3. | Einans kongbøndur við meiri enn 4 mk. | 23 |
| | Kongs- og óðalsb — — - 4 — | 4 |
| 4. | Einans óðalsbøndur | 13 |

Markatalið hjá *kongsbóndunum* í hvörjum einstök. bólki:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bólkur 1: | 17 | kongsbøndur við tils. | $14^1/_4$ |
| — 2: | 17 | — - — | $41^3/_4$ |
| — 3: | 27 | — - — | $367^1/_4$ |

Íalt 61 kongsb. við tils. $423^1/_4$ mk. (+ $12^7/_8$ mk.)[45]).

— og hjá *óðalsbóndunum:*

Bólkur 4: 19 (20) óðalsböndur (13 + tils. 6 frá hinum bólkunum — og harafturat 1 óðalsbóndi, Euden Anderssön (nr. 2, rað A, s. 23), sum tó var búsettur í Eysturoy) við tils. 148¼ mk.[46])

Aftur at hesum kemur tað gjaldfría góðsið, 8 mk. í Kvívík (nr. 25, rað A, s. 21), 16 mk. í Syðradali (nr. 19, rað A, s. 21) og 4 mk. á Argjum (nr. 4, rað A, s. 21). — Tá báðir prestarnir (harra Morten Jespersen í Havn)[47]) og harra Anders Hendriksen í Kvívík) eru festarar av aðrari jörð og annar (Anders Hendriksen) harumframt er óðalsbóndi, eru báðir tiknir við omanfyri.

45) Góðs Peder Jacobsens í Suðuroy (sb. viðm. 21).

46) Markatalið í Streymoy o.s.fr. (Trap): 601½ mk. Tá vit frá hesum taka kongsgóðsið í 1584, (423¼ mk. + 2 mk. (sb. viðm. 27) + benef. góðs, 28 mk. — íalt) 453¼ mk., verður óðalsgóðsið 148¼ mk.

47) Presturin í Suðurstreymoy hevði bústað í Havn, meðan Syðridalur hoyrdi við til prestaembætið sum beneficerað góðs (sb. viðm. 23).

# Ognarbýtingin fyri Eysturoy 1584.

*Division of landed property in Eysturoy in 1584.*

## 1. Einans kongsbøndur:

| nr. | mk. | nr. | mk. | nr. | mk. | nr. | mk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 17 | $1^{2}/_{3}$ | 34 | 3 | 51 | $5^{1}/_{2}$[49] |
| 2 | $1^{1}/_{2}$ | 18 | $1^{2}/_{3}$ | 35 | 3 | 52 | 6 |
| 3 | $^{1}/_{4}$ | 19 | $^{1}/_{5}$ | 36 | $6^{1}/_{3}$ | 53 | $4^{1}/_{2}$ |
| 4 | $^{1}/_{4}$ | 20 | $^{1}/_{5}$ | 37 | $6^{1}/_{3}$ | 54 | $5^{1}/_{2}$ |
| 5 | $^{1}/_{2}$ | 21 | $^{1}/_{5}$ | 38 | $6^{1}/_{3}$ | 55 | $2^{1}/_{4}$ |
| 6 | $^{1}/_{8}$ | 22 | $^{1}/_{5}$ | 39 | $3^{1}/_{4}$ | 56 | $2^{1}/_{4}$ |
| 7 | $^{1}/_{8}$ | 23 | $13^{1}/_{2}$ | 40 | $2^{1}/_{4}$ | 57 | $^{1}/_{2}$ |
| 8 | $^{1}/_{2}$ | 24 | 3 | 41 | $51^{7}/_{8}$[48] | 58 | 1 |
| 9 | $14^{1}/_{4}$ | 25 | 2 | 42 | 5 | 60 | $2^{1}/_{2}$ |
| 10 | $1^{5}/_{8}$ | 26 | 1 | 44 | 4 | 61 | 10 |
| 11 | $^{3}/_{4}$ | 27 | $5^{1}/_{2}$ | 45 | $1^{1}/_{4}$ | 62 | 4 |
| 12 | $2^{1}/_{4}$ | 28 | 2 | 46 | 3 | 64 | $^{1}/_{2}$ |
| 13 | 3 | 29 | $6^{1}/_{2}$ | 47 | 4 | | |
| 14 | 1 | 31 | 2 | 48 | $1^{1}/_{2}$ | | |
| 15 | $4^{5}/_{8}$ | 32 | $6^{1}/_{4}$ | 49 | $1^{1}/_{2}$ | | |
| 16 | $1^{2}/_{3}$ | 33 | $3^{3}/_{8}$ | 50 | $3^{1}/_{2}$ | | |

Íalt 60 kongsbøndur við tils. $234^{3}/_{10}$ mk.

## 2. Kongs- og óðalsbøndur samstundis:

| nr. | mk. |
|---|---|
| 30 | $2^{1}/_{2}$ + óðb. |
| 43 | $5^{1}/_{5}$ + óðb. |
| 59 | $5^{1}/_{2}$ + óðb. |
| 63 | $14^{3}/_{4}$ + óðb. |

Íalt 4 kongs- og óðalsb. við tils. $27^{19}/_{20}$ mk.

## 3. Einans óðalsbøndur: 24.

48) (sb. viðm. 27) Jón Heinason.

49) Festið liggur í Oyndarfirði (nr. 13, rað A, s. 26).

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Einans kongsbøndur við 1 mk. og minni | | 16 |
| | Kongs- og óðalsb. | - 1 - - — | 0 |
| 2. | Einans kongsbøndur við 1 til 4 mk. | | 28 |
| | Kongs- og óðalsb. | - 1 - 4 — | 1 |
| 3. | Einans kongsb. við meiri enn 4 — | | 16 |
| | Kongs- og óðalsb. | — — 4 — | 3 |
| 4. | Einans óðalsbøndur | | 24 |

Markatalið hjá *kongsbóndunum* í hvörjum einstök. bólki:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1: | 16 | kongsb. við tils. | $7^3/_{10}$ | mk. |
| — 2: | 29 | — — — | $71^1/_2$ | — |
| — 3: | 19 | — — — | $183^9/_{20}$ | — |

Íalt 64 kongsb. við tilsamans $262^1/_4$ (+ 16 mk.)[50]).

— og hjá *óðalsbóndunum:*

Bólkur 4: 28 óðalsböndur ( 24 + tils. 4 frá hinum bólkunum) við tils. 203¼ mk.[51])

Aftur at hesum kemur tað gjaldfría góðsið, 24 mk. á Nesi (presta- og próstagarðurin, nr. 70, rað A, s. 27) og harumframt 11½ mk. í Oyndarfirði (nr. 20, rað A, s. 26), sum prósturin hevði afturat sum beneficarium. — Tá presturin (prósturin) eisini er festari av aðrari jörð í Eysturoy[52]), er hann tikin við omanfyri.

---

[50]) Góðs Jón Heinasonar í Sandoy, Streymoy og Norðuroyum (sb. viðm. 27).

[51]) Markatalið í Eysturoy (Trap): 502 mk. Tá vit frá hesum taka kongsgóðsið í 1584,(262¼ mk. + 1 mk. ((sb. viðm. 39) + benef. góðs, 35½ mk. — íalt) 298¾ mk., verður óðalsgóðsið 203¼ mk.

[52]) Í Oyndarfirði (sb. viðm. 49).

## Ognarbýtingin fyri Norðuroyar 1584.

*Division of landed property in Norðuroyar in 1584.*

1. Einans kongsbøndur:

| nr. | mk. | nr. | mk. | nr. | mk. | nr. | mk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 4 | 12 | 2 | 22 | 5 | 31 | 16 |
| 3 | $6\frac{3}{4}$ | 13 | $1\frac{5}{16}$ | 23 | $2\frac{1}{2}$ | 32 | 4 |
| 4 | $6\frac{3}{4}$ | 14 | $1\frac{5}{16}$ | 24 | $\frac{1}{4}$ | 33 | $1\frac{1}{2}$ |
| 6 | 2 | 15 | $1\frac{5}{16}$ | 25 | 9 | 34 | $1\frac{1}{2}$ |
| 7 | $\frac{3}{4}$ | 17 | $3\frac{9}{16}$ | 26 | $1\frac{1}{4}$ | 35 | $1\frac{1}{2}$ |
| 8 | $1\frac{3}{4}$ | 18 | 1 | 27 | $28\frac{1}{2}$ | 36 | 4 |
| 9 | $1\frac{1}{2}$ | 19 | $\frac{1}{2}$ | 28 | 4 | 37 | $\frac{1}{2}$ |
| 10 | $3\frac{1}{2}$ | 20 | 6 | 29 | 13 | 38 | 3 |
| 11 | 3 | 21 | $5\frac{1}{4}$ | 30 | 8 | 39 | $2\frac{1}{2}$ |

Íalt 36 kongsb. við tilsamans $158\frac{1}{4}$ mk.

2. Kongs- og óðalsbøndur samstundis:

| nr. | mk. |
|---|---|
| 2 | $6\frac{3}{4}$ + óðb. |
| 5 | $1\frac{1}{2}$ + óðb. |
| 16 | 7 + óðb. |
| 40 | 3 + óðb. |
| 41 | $5\frac{1}{2}$ + óðb. |

Íalt 5 kongs- og óðalsb. við tils. $23\frac{3}{4}$ mk.

3. Einans óðalsbøndur: 19.

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Einans kongsbøndur við 1 mk. og minni | 5 |
| | Kongs- og óðalsb. — 1 — - — | 0 |
| 2. | Einans kongsbøndur — 1 til 4 mk. | 21 |
| | Kongs- og óðalsb. — 1 - 4 — | 2 |
| 3. | Einans kongsbøndur við meiri enn 4 mk. | 10 |
| | Kongs- og óðalsb. — — - 4 — | 3 |
| 4. | Einans óðalsbøndur | 19 |

Markatalið hjá *kongsbóndunum* í hvörjum einstök. bólki:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1: | 5 kongsb. | við tils. | 3 | mk. |
| — 2: | 23 | — — | 55½ | — |
| — 3: | 13 | — — | 123½ | — |

Íalt 41 kongsb. við tilsamans 182 mk.

— og hjá *óðalsbóndunum:*
Bólkur 4: 24 óðalsböndur (19 + tils. 5 frá hinum bólkunum) við tils. 218 mk. 5 sk.[53]).

Aftur at hesum kemur tað gjaldfría góðsið, 12 mk. av tí 16 marka garðinum, sum presturin hevur tær 4 mk. av í festi (nr. 37, rað A, s. 31). — Tá presturin eisini er festari av aðrari jörð, er hann tikin við omanfyri.

Verða teir einstöku bólkarnir tiknir saman fyri allar oyggjarnar, verður úrslitið hetta:

| | 1 | | 2 | | 3 | | 4 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Einans kb. við 1 mk. og minni | Kb. og óðb. við 1 mk. og minni | Einans kb. við 1 til 4 mk. | Kb. og óðb. við 1 til 4 mk. | Einans kb. við meiri enn 4 mk. | Kb. og óðb. við meiri enn 4 mk. | Einans óðalsbønd. | Tilsamans |
| Suðuroy og L. Dímun[54]) | 22 | 6 | 6 | 2 | 7 | 1 | 28 | 72 |
| Sandoy, Skúvoy, St. Dímun | 11 | 1 | 5 | 1 | 8 | 2 | 24 | 52 |
| Vágar og Mykines | 9 | 0 | 12 | 2 | 2 | 1 | 12 | 38 |
| Streymoy, Nólsoy, Hest. og Koltur | 17 | 0 | 15 | 2 | 23 | 4 | 13 | 74 |
| Eysturoy | 16 | 0 | 28 | 1 | 16 | 3 | 24 | 88 |
| Norðuroyar | 5 | 0 | 21 | 2 | 10 | 3 | 19 | 60 |
| Tilsamans | 80 | 7 | 87 | 10 | 66 | 14 | 120 | 384 |

53) Markatalið í Norðuroyum (Trap): 424¾ mk. 5 skinn. Tá vit frá hesum taka kongsgóðsið í 1584, (182 mk. + 12¾ mk. (sb. viðm. 27) + benef. góðs, 12 mk. — íalt) 206¾ mk., verður óðalsgóðsið 218 mk. 5 skinn.

54) Henda oyggj hevur sum oftast hoyrt við til Suðuroy. Jarðabókin sigur, at leigan verður goldin av ymsum, tá eingin vil festa oynna.

Tá tað endaliga úrslitið fyri kongsböndur og óðalsböndur undir einum, 384, ikki samsvarar talinum fyri »verunligar« uppihaldarar[55]), er orsökin tann, at tveir av prestunum, sum nevnt undir Suðuroy og Sandoy, ikki eru tiknir við.

Talvan vísir annars stöddina á kongsfestunum innan fyri teir fyrstu 3 bólkarnar. Tað sæst, at báðir teir fyrstu bólkarnir, ið umboða tað, ið nevnast kann tey smáu og miðalstóru kongsfestini, ikki eru so avbera ólíkir til stöddar. Samanlagdir vísa teir seg at fata um meginpartin av kongsböndunum, sum sostatt hevur sitið við búum frá undir 1 mörk til (og við) 4 merkur til stöddar. Nakað annað er, at meginparturin av tí fyrsta bólkinum av kongsböndum neyvan hevur kunnað livað av tí jörð, sum teir hava havt í festi, ið hvussu er ikki teir við undir 1 mörk, sum ikki samstundis hava verið óðalsböndur, og tað eru teir fægstu. Teir hava tí uttan iva verið noyddir at arbeiða sum bönarmenn á teim störru görðunum. Og orsakað av hesum, at kanska upp ímóti $^1/_3$ av kongsfestarunum við konum og störri börnum samstundis hava gjört tað út fyri leyst arbeiðisfólk, hava teir stóru garðarnir fingið eina nögd av fólki til raksturin út yvir tað fasta.

Tann 3. bólkurin av kongsfestarum rökkur um bú-stöddir frá u. $4\frac{1}{2}$ mörk heilt upp um 30 merkur fyri einsamallar garðar, fyri fleiri garðar undir sama festara heilt upp um 50 merkur. Tó eru tað heilt fáir av festarunum í hesum bólki, ið hava sitið við einum einstakum, heilt stórum garði ella fleiri görðum undir einum. Tað vanliga fyri teir stóru garðarnar hevur verið upp til einar 10 ella 12 merkur. Av heilt stórum kongsböndum við meiri enn 20 merkrum, hava ikki verið yvir 10, uttan so at teir av teimum, ið eisini hava verið óðalsböndur, eru komnir upp á tey heilt stóru markatölini, tá ognin verður lögd afturat.

[55]) t. e. kongsböndur og óðalsböndur (ikki uppsitarar) — 386 (tölini s. 33 fyri kongsb. og óðalsb. samanlögd — 266 kb. + 120 óðb.).

Viðvíkjandi *markatalinum* fyri hvönn einstakan av teim 3 bólkunum av festarum er tað gjörligt út frá uppgerðunum av tí fyri tær einstöku oyggjarnar at finna fram til eitt miðaltal fyri hvönn festara í hvörjum bólki fyri seg, og somuleiðis fyri allar bólkarnar undir einum at útrokna eitt miðaltal.

1. Hvør bólkur fyri seg:

Bólkur 1. Festarar við 1 mk. og minni.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 28 f. við tils. | $14^{11}/_{20}$ mk.; | um 0,5 mk. | til hvønn. |
| Sandoy o. s. fr. | 12 f. við tils. | $6^{11}/_{12}$ mk.; | um 0,6 mk. | til hvønn. |
| Vágar o. s. fr. | 9 f. við tils. | $6^{3}/_{4}$ mk; | um 0,8 mk. | til hvønn. |
| Streymoy o. s. fr. | 17 f. við tils. | $14^{1}/_{4}$ mk; | um 0,8 mk. | til hvønn. |
| Eysturoy | 16 f. við tils. | $7^{3}/_{10}$ mk; | um 0,5 mk. | til hvønn. |
| Norðuroyar | 5 f. við tils. | 3 mk; | um 0,6 mk. | til hvønn. |

Íalt 87 f. við tils. $52^{23}/_{30}$ mk.; um 0,6 mk. til hvønn.

Vit síggja, at Streymoy o.s.fr. og Vágar o.s.fr. hava yvirlutan í bólkinum við um $^{4}/_{5}$ mk. í miðal fyri hvönn festara. Sandoy o.s.fr. og Norðuroyar eru miðstaddar við um $^{3}/_{5}$ mk., Suðuroy og Eysturoy lægstar við um $1/2$ mk. fyri hvönn festara. Miðaltalið fyri oyggjarnar undir einum vísir seg at vera um $^{3}/_{5}$ mk. fyri hvönn festara.

Bólkur 2. Festarar við 1 til 4 merkrum.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 8 f. við tils. | $14^{19}/_{20}$ mk.; | um 1,9 mk. | til hvønn. |
| Sandoy o. s. fr. | 6 f. við tils. | $13^{1}/_{3}$ mk.; | um 2,2 mk. | til hvønn. |
| Vágar o. s. fr. | 14 f. við tils. | $29^{3}/_{4}$ mk.; | um 2,1 mk. | til hvønn. |
| Streymoy o. s. fr. | 17 f. við tils. | $41^{3}/_{4}$ mk.; | um 2,5 mk. | til hvønn. |
| Eysturoy | 29 f. við tils. | $71^{1}/_{2}$ mk.; | um 2,5 mk. | til hvønn. |
| Norðuroyar | 23 f. við tils. | $55^{1}/_{2}$ mk.; | um 2,4 mk. | til hvønn. |

Íalt 97 f. við tils. $226^{47}/_{60}$ mk.; um 2,3 mk. til hvønn.

Vit síggja her, at Streymoy o.s.fr. og Eysturoy liggja á odda í bólkinum við um $2^{1}/_{2}$ merkrum í miðal fyri hvönn

festara. So koma Norðuroyar við um $2^2/_5$ mk., Sandoy o.s.fr. við um $2^1/_5$ mk., Vágar o.s.fr. við um $2^1/_{10}$ mk. og seinast Suðuroy við um $1^9/_{10}$ mk. í miðal fyri hvönn festara. Miðaltalið fyri oyggjarnar undir einum vísir seg at vera um $2^3/_{10}$ mk. fyri hvönn festara.

Bólkur 3. Festarar við meiri enn 4 mk.

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 8 f. | við tils. | $55^3/_4$ | mk.; | um | 7,0 mk. til hvønn. |
| Sandoy o.s.fr. | 10 f. | við tils. | 90 | mk.; | um | 9,0 mk. til hvønn. |
| Vágar o.s.fr. | 3 f. | við tils. | $16^3/_4$ | mk.; | um | 5,6 mk. til hvønn. |
| Streymoy o.s.fr. | 27 f. | við tils. | $367^1/_4$ | mk.; | um | 13,2 mk. til hvønn. |
| Eysturoy | 19 f. | við tils. | $183^9/_{20}$ | mk.: | um | 9,7 mk. til hvønn. |
| Norðuroyar | 13 f. | við tils. | $123^1/_2$ | mk.; | um | 9,5 mk. til hvønn. |

Íalt 80 f. við tils. $849^{23}/_{24}$ mk.; um 10,6 mk. til hvønn.

Streymoy o.s.fr. sæst at liggja á odda í bólkinum við um $13^1/_5$ mk. í miðal fyri hvönn festara. Atvoldin til hetta eru tey stóru einstöku festini við fleiri görðum undir einum her á heldur fáum hondum. Næst kemur Eysturoy, men munandi lægri, við um $9^7/_{10}$ mk. fyri hvönn festara, so Norðuroyar við um $9\frac{1}{2}$ mk. og Sandoy o.s.fr. við um 9 mk. fyri hvönn festara. Suðuroy sæst at hava yvirlutan yvir Vágum o. s. fr. við um 7 mk. móti um $5^3/_5$ mk. fyri hvönn festara, men má lúta fyri hinum oyggjunum. Miðaltalið fyri oyggjarnar undir einum vísir seg at vera um $10^3/_5$ mk. fyri hvönn festara.

2. Allir bólkar undir einum:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 44 f. | við $84^1/_4$ mk. (+ 1 mk.)[56]; | 1,9 mk. til hvønn. |
| Sandoy o.s.fr. | 28 f. | við $110^1/_4$ mk.; | um 3,9 mk. til hvønn. |
| Vágar o.s.fr. | 26 f. | við $53^1/_4$ mk.; | um 2,0 mk. til hvønn. |
| Streymoy o.s.fr. | 61 f. | við $423^1/_4$ mk. (+ $12^7/_8$ mk.)[56]; | um 6,9 mk. t. hv. |
| Eysturoy | 64 f. | við $262^1/_4$ mk. (+ 16 mk.)[56]; | um 4,1 mk. t. hv. |
| Norðuroyar | 41 f. | við 182 mk.; | um 4,4 mk. til hvønn. |

Íalt 364 f. við $1145^1/_8$ mk.; um 3,1 mk. til hvønn.

[56]) Fyri at lætta um eru hesi trý töl ikki tikin við í útrokningini fyri viðkomandi oyggjar, men eru við í tí samlaða talinum.

Tá allir bólkarnir verða tiknir undir einum, sæst Streymoy o.s.fr. at liggja á odda við tí största miðalmarkatalinum fyri hvönn festara, um $6^{9}/_{10}$ mk. Her eigur at viðmerkjast, at somuleiðis sum fyri bólk 3 omanfyri hava eisini her tey stóru einstöku festini ella fleiri stór festi undir einum á heldur fáum hondum gjört um seg. So koma Norðuroyar við um $4^{2}/_{5}$ mk., Eysturoy við um $4^{1}/_{10}$ mk., Sandoy o.s.fr. við um $3^{9}/_{10}$ mk., Vágar o.s.fr. við um 2 mk. og at enda Suðuroy við um $1^{9}/_{10}$ mk. fyri hvönn festara. Miðaltalið fyri oyggjarnar undir einum vísir seg at vera $3^{1}/_{10}$ mk. fyri hvönn festara.

Eftir eru óðalsböndurnir at viðgera. Teimum viðvíkjandi mugu vit, sum nevnt, sláa okkum til tols við eini uppgerð yvir samlaða tal teirra vegna tess at ongar upplýsingar um stöddina á óðalsbúgvunum sínámillum eru tökar, og *bólkur 4* í talvuni frammanfyri uppger hetta talið fyri teir, ið einans hava verið óðalsböndur, til 120. Nú umboða aftur at hesum eisini hinir 3 bólkarnir nakrar óðalsböndur við tað, at nakrir av hesum hava verið kongsböndur eisini, og við hesum seinastu (7 frá bólki 1, 10 frá bólki 2 og 14 frá bólki 3), umframt 3 óðalsböndur afturat, sum ikki eru tiknir við millum hesar í talvuni (Peder Jacobsen undir Suðuroy (s. 11) og tveir av prestunum — í Suðuroy og Eysturoy), verður talið á teimum bóndum, ið hava sitið við teim u. 1133 óðalsmerkrunum í 1584, 154.

Men sum áður nevnt var ikki öll óðalsjörðin á föroyskum hondum, ein part av henni áttu tveir danskir og norskir stórognarmenn av aðalsættunum Rosenkrantz og Benkestok[57]). Hjá Rosenkrantzunum kann stöddin hava ligið um

[57]) Góðs Rosenkrantzanna hevði navn eftir Holger Eriksön Rosenkrantz (d. 1496; Dansk Biografisk Leksikon, bd. XX, s. 123), í hvörs ogn tað var komið gjögnum konuna, Margrete Flemming, og var tað gingið í arv gjögnum ættarlið líka frá Agnetu, dóttur Hákun V Magnussonar og manni hennara, Haftor Jonsson. — Benkestokkarnir vóru ættaðir niður frá hini gomlu viðgitnu ættini Smör, ið hevði átt jörð í Föroyum síðan landnámstíðina. — Í

170 merkur, um 100 merkur[58]) hjá Benkestokkunum. Jörðin var givin föroyskum bóndum í festi, og vegna tess at eingir limir av hesum báðum ættunum nakrantíð hava verið í Föroyum, hövdu teir, ið hövdu kongliga handilin í hondum ella fútin umsjónina við jörðini og kravdu upp festigjöldini. Av röttum kunnu vit sostatt ikki rokna við öllum teim 154 óðalsbóndunum omanfyri sum ánarar av jörðini. Men kortini er hetta tað einasta at gera í hesi uppgerð. Tí vegna tess, at einki er til skjals um, at teir sonevndu »aðalsböndurnir« vóru undantiknir frá skattinum til kongs, mugu teir í jarðabókunum vera settir millum teirra, ið eisini bert hövdu skatt til ríkið at gjalda — óðalsböndurnar.

Viðvíkjandi óðalsmarkatalinum eru vit á sama hátt sum fyri kongsböndurnar för fyri at útrokna eitt miðaltal fyri hvönn óðalsbónda, bæði fyri hvörja einstaka oyggj ella bólk av oyggjum og fyri allar oyggjarnar undir einum. Tó mugu vit her sláa okkum til tols við eini tílíkari útrokning fyri óðalsböndurnar undir einum vegna tess at tað jú er ógjörligt at greina teir upp í bólkar somuleiðis sum kongsböndurnar og síðan finna eitt miðaltal fyri hvönn bólk. — Undir hvörjari oyggj fyri seg er lýst (kallað »bólkur 4«) talið á óðalsbóndunum á tí oyggj ella bólki av oyggjum við óðalsmarkatali teirra. Vit fáa sostatt:

---

17. öld seldu ánararnir jørðina, tá umsitingin av henni mátti vera sera torför fyri teir, tí teir vóru so langt burturstaddir. Ein part keyptu böndurnir, ein part »Det islandske Kompagni«, sum 1619—55 hevði oyggjarnar í len (til 1662 handilin. Sb. N. Andersen: Færöerne 1600—1709, s. 330 f. f.

[58]) Góðs Benkestokkanna var eftir N. Andersen 98½ mk.; tað hjá *Rosenkrantzunum er* ikki beinleiðis tilskilað. Men eftir matrikulbókini fyri 1715 er tann tá sokallaða »Kompagniens og Kiöbejord« sett til 267⁷/₂₄ mk. og síðusett við góðs krúnunnar og óðalsgóðsið. Hesar u. 267 mk. í 1715 má vera tað fyrrverandi aðalsgóðsið, sum »kompagníið« og böndurnir hövdu keypt í sínari tíð (sb. N. Andersen, s. 330 f.f.). Tá ið góðs Benkestokkanna hevur verið 98½ mk., kunnu vit meta Rosenkrantzanna til 168¹⁹/₂₄ mk.

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 40 óðb. | við $253^3/_4$ mk.: | um 6,3 mk. | til hvønn. |
| Sandoy o.s.fr. | 28 óðb. | við $156^3/_4$ mk; | um 5,6 mk. | til hvønn. |
| Vágar o.s.fr. | 16 óðb. | við $153^1/_2$ mk; | um 9,6 mk. | til hvønn. |
| Streymoy o s.fr. | 20 óðb. | við $148^1/_4$ mk.; | um 7,4 mk. | til hvønn. |
| Eysturoy | 28 óðb. | við $203^1/_4$ mk.; | um 7,3 mk. | til hvønn. |
| Norðuroyar | 24 óðb. | við um 218 mk.; | um 9,1 mk. | til hvønn. |
| Tilsamans | 154[59]) óðb. | við um $1133^1/_2$ mk.; | um 7,4 mk. | til hvønn. |

Vit síggja, at Vágar o.s.fr. liggja her á odda við um $9^3/_5$ mk. í miðal fyri hvönn óðalsbónda. So koma Norðuroyar við um $9^1/_{10}$ mk., Streymoy við um $7^2/_5$ mk., Eysturoy við um $7^3/_{10}$ mk., Suðuroy við um $6^3/_{10}$ mk. og at enda Sandoy o.s.fr. við um $5^3/_5$ mk. Miðaltalið fyri oyggjarnar undir einum vísir seg at vera um $7^2/_5$ mk. fyri hvönn óðalsbónda.

Verða miðaltölini fyri hvönn óðalsbónda fyri hvörja einstaka oyggj samanborin við tey samsvarandi tölini fyri kongsböndurnar (s. 53, 2. Allir bólkar undir einum), bíta vit merki í yvirlutan, tey fyrru hava yvir teimum seinru orsakað av tí upp á seg lítla talinum av óðalsbóndum, ið hava sitið við teim í flestu oyggjunum yvir kongsmerkrunum ráðandi óðalsmerkrunum (bert í Streymoy o.s.fr. og Eysturoy hevur kongsjörðin havt yvirlutan). — Fyri oyggjarnar undir einum vísir miðaltalið fyri hvönn óðalsbónda seg at vera meiri en tað dupulta av miðaltalinum fyri hvönn festara — orsakað av, at óðalsböndurnir, í tali minni enn helmingurin av kongsbóndunum, hava sitið við ikki langt frá líka so nógvum merkrum sum kongsböndurnir. —

[59]) Tá hetta tal (154) ikki hóskar við tey samanlögdu tölini her av teim einstöku oyggjunum (156), kemur tað av, (1) at annar av teimum báðum óðalsb., ið koma afturat í Suðuroy (sb. s. 40), Holden Andersen, prestur í Vágum, má verða tikin við sum óðalsb. í lýsingini bæði fyri Suðuroy og Vágar, tá hann er óðb. í báðum stöðum, (2) at tann óðb., ið kemur afturat í Streymoy, Euden Andersen (sb. s. 46), má verða tikin við sum óðb. í lýsingini bæði fyri Streymoy og Eysturoy, tá hann er óðb. í báðum stöðum. Í tí rætta talinum (154) yvir óðb. kunnu teir kortini bert verða tiknir við eina ferð. — Hinir báðir óðb., ið koma afturat, Peder Jacobsen í Suðuroy (s. 40) og Thorluf Gregersen í Vágum (s. 44), eru bert óðb. í nevndu oyggjum; tí verða teir standandi og fara upp í tað verunliga talið fyri óðalsb.

Tó mugu vit gera okkum greitt, at tey nevndu tölini fyri óðalsböndurnar noyðast at verða tikin við nökrum fyrivarni, um nýtsla skal kunna verða gjörd av teimum. Tí sum nevnt var ein partur av óðalsjörðini á fremmandum hondum, og tað at festararnir av hesum parti, aðalsböndurnir, eru tiknir við millum óðalsbóndanna í uppgerð okkara, í sambandi við at aðalsjörðin var spjadd um allar oyggjarnar, ger, at tey nevndu miðaltölini koma at liggja hægri bæði fyri tær einstöku oyggjarnar og allar oyggjarnar[60]) undir einum, enn tey í roynd og veru vildu blivið, um gjörligt hevði verið at skilja aðalsböndurnar út frá óðalsbóndunum — nakað, vit sum nevnt ikki eru för fyri.

Nökur fá orð skulu at enda verða sögd afturat um ta gjaldfríu (beneficeraðu) jörðina. Sum áður nevnt var hon $128^1/_8$ merkur til stöddar í 1584, og býtingin av henni er umrödd undir teim einstöku oyggjunum. — Prestarnir, 7 í tali,[61]) sum jú sótu við tí mesta av hesi jörð, hava allir so nær sum ein (Sandoy) umframt prestajörðini sitið við antin óðalsjörð ella kongsjörð ella báðum. Samanlagt fyri allar oyggjarnar hevur *festijörð* teirra verið 69 mk., og alt í alt hava teir sitið við $178^1/_8$ mk. av ríkisins jörð, umframt óivað heldur ikki smávegis av óðalsgóðsi.

Hvussu leingi kann nú ognarbýtingin sigast at hava havt gildi, soleiðis sum hon her er vorðin lýst? Í fyrstu syftu má hon hugsast at hava staðið við 16. öld út, tí somu növn og bú-stöddir eru við bert fáum undantökum eisini at finna í teimum báðum jarðabókunum, ið til eru afturat fyri 16.

---

[60]) Umframt lá tað blandað saman við bæði óðals- og kongsgóðs, soleiðis at tá tað skuldi verða selt til ymsar, máttti tað verða býtt frá (sb. N. Andersen, s. 335). Fleiri av bæði óðalsb. og kongsb. kunnu tí væl samstundis hava verið festarar undir teim tveimum aðalbornu stórognarmonnunum.

[61]) Verunliga 8, men hin 8., Christen Pedersen Morsing, hevði sum hjálparprestur einki beneficarium (sb. viðm. 22).

öld — tær fyri 1588 og 1590. Og hóast nakrar broytingar eru hendar í jarðabókunum fyri tey fyrstu 3 árini av 17. öld, kann hon óivað yvirhövur góðtakast upp til (og við) 1602—03. Millum 1603 og 1613—14 er eitt glopp við ongum jarðabókum, og tá tær taka við aftur, er ognarbýtingin ein heilt onnur — ein broyting er hend, helst so við og við, við tí úrsliti, at jörðin 30 ár aftan á 1584 er komin á færri hendur og at fyri ein stóran part nýggj növn eru komin at standa í teirra stað, vit í hesi grein hava havt við at gera.

## SUMMARY

The article attempts (1) to calculate the size of the Faroese population about the year 1600 on the basis of the rent-roll of 1584, (2) to determine the division of landed property among the landowners (tenants of the Danish Crown and freeholders) at the same time and according to the source mentioned.

As to the main part of the work we arrive at a population of some *3180* about 1600. The method employed in reaching this number has been to copy and number all names on the rent-roll (column A); this gives a total number of 532 names (p. 9). However, a closer examination of these names discloses the fact that a great number of them are mentioned twice or even several times, hence a reduction in the total number of entries is necessary. This has been made in column B, and the actual number of maintainers turns out to be 436 (p. 33). The latter may be supposed to represent a family of 5 persons each. Result: 2180 persons. But, in addition, a probable number of farm workers, male and female, and pensioners must be taken into account — a number which has been estimated at about 1000. Accordingly the total Faroese population about 1600 will be as mentioned above.

## KELDUTILFAR

Serstakliga *Jarðabókin 1584;* Ríkisskjalasavnið.
*Fólkateljingslistin 1801;* Ríkisskjalasavnið (avskrift á Landsskjalasavninum, Tórshavn).
*Lucas Debes:* Færoæ et Færoa reserata, 1673 (útg. 1903).
*Kancelliets Brevböger 1584—88.*

## BÓKMENTIR

*N. Andersen:* Færöerne 1600—1709; 1895.
*Anton Degn:* Færöske Kongsbönder 1584—1884; 1945.
*Jörgen-Frantz Jacobsen:* Færöerne, Natur og Folk, 1936.
*Trap:* Danmark, bd. IX, greinin »Færö Amt«; 1930.
*Dansk Biografisk Leksikon,* bd. XX.